# *Fólk og ferðavinna — lið um lið*

*Álit um ferðavinnupolitikk fyri Tórshavnar kommunu*
2022 – 2026

# INNIHALDSYVIRLIT


**1. UM FERÐAVINNUPOLITIKKIN** 4

1.2 ARBEIÐSSETNINGUR 5

1.3 ARBEIÐSHÁTTUR 6

1.4 UM ÁTØKINI 7

**2. HVÍ FERÐAVINNA** 8

2.1 FERÐAVINNA OG BÚSKAPUR 10

2.2 VIT TÍMA AT BÚGVA HER 11

2.3 FØROYINGAR FERÐAST EISINI 12

**3. STØÐAN Í FERÐAVINNUNI Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU** 13

3.1 KORONUAVBJÓÐINGAR 14

3.2 ØKT TAL AV FERÐANDI 15

3.3 FLEIRI KØMUR 16

3.4 FLEIRI GISTINGAR OG LONGRI SESONG 17

3.5 ONNUR GISTING 20

3.6 STØRRI LØNARGJALDINGAR OG FLEIRI ÚTLENDSK STARVSFÓLK 21

3.7 MEST FRÍTÍÐARFERÐANDI 23

3.8 FERÐAFÓLKAKANNNING Í 2019 23

**4. BROYTTAR TREYTIR** 25

4.1 KORONA 25

4.2 VEÐURLAGSBROYTINGAR OG TILVITAÐ FERÐANDI 25

4.3 ATFINNINGAR MÓTI FERÐAVINNU 26

4.4 TROT Á ARBEIÐSMEGI 27

4.5 FÓLKATALIÐ ØKT 27

4.6 BETRI SAMFERÐSLUKERVI 27

4.7 ØKTIR GISTIMØGULEIKAR 28

4.8 ALTJÓÐA UMRØÐA 28

4.9 LÓGARKARMAR AT SKIPA VIRKSEMIÐ Í NÁTTÚRUNI 28

**5. FERÐAVINNAN Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU KOMANDI ÁRINI** 29

**6. ÁTØK** 31

**6.1 JAVNVÁG MILLUM BÚGVANDI OG VITJANDI** 32

6.1.1 STYRKJA VINNUFERÐAVINNUNA 32

6.1.2 STYRKJA VISIT TÓRSHAVN 33

6.1.3 FERÐAVINNUÚTBÚGVINGAR Í HAVN 34

6.1.4 NEYVARI FERÐAVINNUHAGTØL 35

6.1.5 STYRKJA SAMSKIFTIÐ VIÐ FERÐAVINNUNA 36

6.1.6 HJÚKLA UM SMÁAR AKTØRAR 36

6.1.7 BETRI FERÐASAMBAND TIL OYGGJARNAR 37

6.1.8 VESI, SKJÓL OG SKELTI 38

6.1.9 FERÐAVINNA FYRI ALLA KOMMUNUNA 38

6.1.10 BÝARLÍV 39

6.1.11 CRUISEVINNAN SKIPAST 39

6.1.12 ATKOMA FYRI ØLL 40

**6.2 KVEIKJANDI MENTAN** 41

6.2.1 ORÐA MENTANARPOLITIKK 42

6.2.2 EVROPEISKUR MENTANARHØVUÐSSTAÐUR 42

6.2.3 SPENNANDI SØVN 43

6.2.4 VARÐVEITA OG VERJA FORNMINNI 44

6.2.5 STUÐLA KOLTURSÆTLANINI 45

**6.3 GRØNT FERÐAMÁL** 46

6.3.1 NÁTTÚRULÍV 47

6.3.2 FERÐ Á GRØNA SKIFTIÐ 47

6.3.3 HÆGRI STIG Í GDS-INDEKSINUM 48

6.3.4 GRØNARI GISTINGARHÚS OG MATSTOVUR 49

6.3.5 BETRI MØGULEIKAR AT SKILJA 49

6.3.6 GRØN KAMPING 50

6.3.7 TJALDING OG SKÝLI 50

6.3.8 KUNNING UM GØTURNAR 51

6.3.9 KENNA VIRKSEMIÐ Í HAGANUM 52

**7. KOSTNAÐARMETING** 52

# 1. UM FERÐAVINNUPOLITIKKIN

## 1.1 INNGANGUR

Grundarlagið undir hesum ferðavinnupolitikkinum er fyrst og fremst, at í Tórshavnar kommunu skal vera gott at búgva – í dag, um fimm ár og hjá komandi ættarliðum.

Ferðavinnan er eitt av týðandi amboðunum at skapa góð samfeløg við trivnaði, vøkstri og menning. Sum úrslit av vaksandi ferðavinnuni í Føroyum hava vit í dag ein hóp av mat- og kaffistovum í høvuðsstaðnum. Nýggjar fyritøkur síggja dagsins ljós við spennandi upplivingum. Ung flyta heim aftur á klettarnar, og vit gerast errin av okkara fjøllum, mati, móta, tónleiki, søgu og máli.

Í 2019 stóð ferðavinnan fyri umleið 10% av størvunum kring heimin, og júst hendan vinnan verður mett at vera ein hin besti katalysatorurin at menna og nútímansgera samfeløg.

Ferðavinnan blómaði, tá ið koronufarsóttin brádliga í 2020 legði ferðavinnuna kring allan heimin lamna. Eisini í Føroyum rakti hon sera meint.

Nú eru dyrnar millum Føroyar og útheimin tíbetur opnar aftur, og Tórshavnar kommuna er væl fyri at taka ímóti ferðafólki: Gistingarkapasiteturin er meira enn tvífaldaður seinastu árini. Flestu matstovurnar í landinum eru í Havn. Her eru nógv søvn, og karmarnir at vera vertur fyri altjóða ráðstevnum og ítróttartiltøkum eru góðir.

Hesin ferðavinnupolitikkurin hjá Tórshavnar kommunu fevnir um árini 2022 til 2026, men nógv av málunum røkka enn longri fram.

Kjarnin í politikkinum er, at ferðandi og fastbúgvandi skulu trívast lið um lið. Hetta merkir, at tá ið átøk og verkætlanir skulu fyrireikast til ferðavinnuendamál, má altíð havast í huga, at hesi gagna nærumhvørvinum. Vit skulu raðfesta tilboð, sum *bæði* gagna fastbúgvandi og ferðafólki. Vit skulu altíð royna at finna loysnir, sum tryggja, at lokalur trivnaður og ferðavinna ganga hond í hond.

Grundleggjandi í framtíðar ferðavinnumenning er, at hon í øllum skal stremba eftir at vera endurskapandi – bæði umhvørvisliga og samfelagsliga. Náttúran skal njótast og verjast – og meira enn tað. Hon skal eisini mennast soleiðis, at hon verður latin okkara eftirkomarum í betri standi enn í dag. Eisini skal ferðavinnan menna samfelagið, so vit framhaldandi hava eitt gott og gevandi samfelag at liva og virka í.

Hesin ferðavinnupolitikkurin byggir á herðarnar á undanfarna ferðavinnupolitikki hjá Tórshavnar kommunu „Tórshavn sum ferðavinnubýur“, sum fevndi um átøk frá 2017–2020. Breið semja er um, at ferðavinnupolitikkurin hevur verið eitt gott og neyðugt amboð hjá øllum, sum arbeiða við ferðavinnu, og flestu tilmælini eru sett í verk.

Ferðavinnan broytist skjótt og samfelagið við. Tórshavnar kommuna eigur støðugt at seta sær mál fyri, hvussu vit framhaldandi kunnu tryggja bestu umstøðurnar fyri eini burðardyggari og endurskapandi ferðavinnu í høvuðsstaðnum.

Við átøkunum í hesum ferðavinnupolitikki „Fólk og ferðavinna lið um lið“ vónar arbeiðsbólkurin at geva kommunu, ferðavinnu og borgarum nøkur amboð at lofta møguleikunum at menna eina blómandi ferðavinnu komandi árini.

Hetta álitið liggur sum grundarlag undir sjálvum ferðavinnupolitikkinum, sum er í einum bóklingi fyri seg. Her í fyrsta parti eru arbeiðssetningur og arbeiðsháttur hjá arbeiðsbólkinum. Í øðrum parti verður greitt frá, hví vit sum kommuna og land eiga at satsa upp á ferðavinnu. Í triðja parti er ein støðulýsing av ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu, og í fjórða parti verða lýstar nakrar av broyttu treytunum hjá okkara ferðavinnu at virka undir. Yvirskipaða hugsanin aftan fyri ferðavinnupolitikkin, sum arbeiðsbólkurin mælir til, stendur í fimta parti. Í sætta parti eru uppskot um ítøkilig átøk, sum arbeiðsbólkurin mælir til at fremja komandi árini. Grundgivið verður fyri, hví átøkini eru neyðug, og hvør ið hevur ábyrgd av at fremja tey í verki. Í sjeynda parti er kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri íverksetan av einstøku tilmælunum.

## 1.2 ARBEIÐSSETNINGUR

Arbeiðsbólkurin fór til verka 1. september 2021 eftir hesum arbeiðssetningi:

- Arbeiðsbólkurin skal lýsa verandi støðu hjá ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu og gera uppskot til nýggjan ferðavinnupolitikk.
- Uppskotið til ferðavinnupolitikk skal leggja dent á, hvussu kommunan best kann skapa karmar um eina ferðavinnu, sum er burðardygg sosialt, umhvørvisliga og búskaparliga.
- Uppskotið skal gera greitt, hvør er uppgávan hjá ávikavist kommununi og vinnuni í strembanini eftir at skapa eina burðardygga ferðavinnu í høvuðsstaðnum.
- Lýsingin og tilmælini skulu vera grundað á viðkomandi hagtøl, kanningar og frágreiðingar. Gjøgnum samskifti við borgarar, vinnulív, áhugabólkar og onnur skal arbeiðsbólkurin tryggja, at sjónarmiðini hjá ymsu pørtunum verða viðgjørd í arbeiðinum at orða ferðavinnupolitikkin.

Uppgávan var eisini at koma við eini tíðarætlan fyri íverksetan av tilmælunum, meting av ábyrgdarbýtinum og kostnaðarmeting av átøkunum.

**Arbeiðsbólkur**
Doris Bjarkhamar, forkvinna
Liljan Weihe
Fríði Bjørgfinsson Nielsen
Sissal Christina Fosaa
Óluva Zachariasen, verkætlanarfólk

## 1.3 ARBEIÐSHÁTTUR

Tilmælini í hesum ferðavinnupolitikkinum eru í stóran mun bygd á:

- Samrøður við borgarar, vinnulív, stovnar, myndugleikar, áhugabólkar og persónar, sum á ymsan hátt mugu metast at geva íkast til ferðavinnupolitikkin. Hetta eru m.a. gistingarhús, ferðaleiðarar, bøndur, handilsvinna, stórar og smáar ferðavinnufyritøkur og viðkomandi starvsfólk í Tórshavnar kommunu.
- Fundir við staðbundnu nevndirnar í kommununi fyri at hoyra um ætlanir og tørv hjá bygdunum uttan fyri Tórshavnarøkið.
- Fokusbólkasamrøður, har bólkar við 7–9 fólkum í trimum umførum vóru savnað at tosa um framtíðar ferðavinnu í Tórshavnar kommunu. Í bólkunum var dentur lagdur á eina breiða aldurssamanseting, javna umboðan millum kynini, og at luttakararnir høvdu ymiska bakgrund og størv, m.a. vinnurekandi í ferðavinnuni, listafólk, lesandi, pensjónistar, akademikarar, bøndur, lívfrøðingar og ítróttarfólk.
- Hagtøl frá m.a. Hagstovu Føroya, Visit Faroe Islands og Vakstrarforum.
- Frágreiðingar og ferðavinnustrategiir í okkara grannalondum og -býum
- Framløgur og ráðstevnur, m.a. Regenerative Tourism, sum NORA og Visit Faroe Islands skipaðu fyri í oktober 2021.
- Gallup-ferðafólkakanning 2019 hjá Visit Tórshavn, Visit Faroe Islands og Tórshavnar Havn.
- Menningarætlan hjá Visit Faroe Islands frá 2019 „At menna og varðveita um somu leið“.
- Frágreiðing hjá Vakstrarforum til landsstýrið 2022 „Vinnuferðavinna – tilmæli um, hvussu Føroyar gerast eitt burðardyggari ferðamál“.
- Umhvørvispolitikkin og orkupolitikkin hjá Tórshavnar kommunu.

Í samrøðunum hava fleiri evni verið viðgjørd, alt eftir um talan hevur verið um íbúgvar, vinnurekandi, stovnar ella fokusbólkar. Høvuðsevnini í samrøðunum hava m.a. verið hesi:

- Hvussu kann kommunan skapa góðar karmar rundan um ferðavinnuna?
- Hvørji ferðavinnutilboð eiga at vera í høvuðsstaðarkommununi?

- Hvussu kunnu ferðavinna og gerandislívið hjá íbúgvunum best trívast lið um lið?
- Hvørjar møguleikar síggja staðbundnu nevndirnar í ferðavinnuni komandi árini?
- Hvussu virkar samstarvið við kommununa í dag, og hvat kann gerast betur?
- Hvat gevur ferðavinnan okkum og okkara samfelag í dag?
- Hvørjir eru fremstu fyrimunir og vansar við ferðavinnu?
- Hvussu kláraðu tey vinnurekandi í ferðavinnuni seg gjøgnum tíðina við koronu-avmarkingum?
- Hvussu menna vit eina ferðavinnu, sum er burðardygg og endurskapandi?

Tað hevur sjálvsagt ikki borið til at tosa við øll, sum liva og virka í kommununi, og koronufarsóttin hevur havt við sær, at ikki hevur verið gjørligt at savna borgarar saman í stórum bólkum. Men arbeiðsbólkurin hevur lagt dent á at koma á tal við ein so breiðan hóp sum gjørligt av vinnurekandi og íbúgvum í Tórshavnar kommunu.

Við støði í samrøðunum, frágreiðingum og øðrum tilfari hevur arbeiðsbólkurin valt tilsamans 26 fokusøki, sum dentur eigur at verða lagdur á komandi árini. Grund-leggjandi hjá arbeiðsbólkinum hevur verið, at í Tórshavnar kommunu skal fyrst og fremst vera gott at búgva, og at Tórshavnar kommuna er eitt grønt ferðamál.

Átøkini í ferðavinnupolitikkinum leggja seg upp at hesum av heimsmálunum hjá ST:




### 1.4 UM ÁTØKINI

Ferðavinnupolitikkurin fevnir um tilsamans 26 fokusøki við átøkum. Summi eru víðfevnd, bæði viðvíkjandi tíðarkarmi, fíggjarorku og samstarvi millum fleiri ak-tørar. Onnur eru avmarkað og krevja lutfalsliga lítla orku at seta í verk.

Flestu uppskotini um átøk venda sær til Tórshavnar kommunu, men í summum førum hevur arbeiðsbólkurin valt at vísa á neyðug átøk, sum landið og aðrir myndugleikar/aktørar hava ábyrgdina av.

Við øll átøkini stendur hvør hevur ábyrgdina av íverksetanini. Eisini er gjørd ein fyribils kostnaðarmeting til flestu átøkini. Galdandi fyri øll átøk er, at metast skal neyvari um kostnaðin, áðrenn tey verða sett í verk.

Hesin politikkurin fevnir formelt um árini 2022–2026. Tó peika nøkur av tilmælunum longri fram enn 2026. Hetta eru tilmæli, sum krevja lutfalsliga nógvar fyrireikingar, áðrenn tey kunnu fremjast. Hinvegin er ferðavinnan ein vinna, sum støðugt er í broyting, og tí má kommunan regluliga eftirmeta og endurnýggja ferðavinnupolitikkin.

Arbeiðsbólkurin er fullgreiður yvir, at tað eisini finnast onnur øki enn júst hesi 26 fokusøkini, sum hava tørv á átøkum. Tíverri ber ikki til at raðfesta alt í senn, og tí hevur arbeiðsbólkurin valt nøkur átøk burturúr, sum hann metir eiga at verða framd næstu árini.

## 2. HVÍ FERÐAVINNA

„Hví skulu vit hava ferðavinnu? Ja, hví ferðast vit sjálvi?“
*– Julianna Klett, advokatur, 82 ár.*

Ferðavinnan er millum tær vinnur í heiminum, sum hevur flest fólk í starvi. Í 2019 vóru 334 mió. størv knýtt at ferðavinnuni kring heimin, og mett verður, at 1 av 10 størvum vóru tengd at ferðavinnu. Ferðavinnan var atvoldin til fjórða hvørt nýtt starv, sum var skapt í tíðarskeiðnum 2014–2019.[1]

Ferðavinnan verður mett at hava sera stóran týdning fyri samfelagsmenning, tí hon m.a. skapar búskaparvøkstur, størv, menning, gevur betri fatan av øðrum mentanum og skapar lutfalsliga nógv størv til kvinnur og ungdóm. Ferðavinnan verður mett at vera ein týðandi katalysatorur fyri at menna og nútímansgera samfeløg.

Tað er púra sjálvsagt, at Tórshavnar kommuna skal fevna hesa vinnuna og skapa so góðar karmar sum yvirhøvur møguligt rundan um hana, soleiðis at bæði borgarar og samfelag fáa ágóðan av henni. Ferðavinnan gevur kommununi skattainntøkur, ger hana meira lokkandi at búgva í og gevur eitt fjølbroyttari úrval av starvs- og frítíðartilboðum.

1 Global Economic Impact and Trends 2021, World Travel & Economic Council (WTTC).

### ÁGÓÐAR AV FERÐAVINNU

- Gevur munandi fíggjarligt ískoyti til búskapin
- Pláss fyri bæði stórum og smáum veitarum
- Skapar grundarlag fyri tilboðum sum t.d. matstovur, konsertir og framsýningar
- Gevur grundarlag fyri størri kapasiteti á rutunetinum loft- og sjóvegis
- Ger tað meira freistandi hjá føroyskum ungdómi at flyta heimaftur
- Víðkar okkara sjónarring og gevur innlit í aðrar mentanir
- Eyka bein at standa á búskaparliga
- Ger okkum tilvitað um okkara náttúru og mentan
- Skundar undir, at vit gerast meira burðardygg
- Eggjar til at verja viðbrekin náttúruøki móti skaðiligum ídnaðarvirksemi
- Umrøðan av ferðamálinum ger landið meira lokkandi fyri íløgur og at flyta til
- Hevur vanliga fleiri størv til kvinnur og ungfólk enn onnur vinna
- Størri marknaður fyri føroyska list, klædnahandverk o.l.
- Fólk gerast errin av at búgva her
- Góðir vinnumøguleikar bæði á bygd og í bý

Sum í øðrum vinnum eru eisini atfinningar. Bæði uttanlands og herheima hava røddir verið frammi um, at ferðavinnan kann hava óhepnar avleiðingar við sær, og at tað tí er umráðandi við góðari stýring.

### ATFINNINGAR MÓTI FERÐAVINNU/FERÐAFÓLKI

- Órógva virksemið í haganum og elva til slit av náttúru
- Rúgva ov nógv upp í ávísum býarpørtum og bygdum
- Ferðing elvir til útlát av vakstrarhúsgassum – serliga ferðing úr fjarskotnum londum
- Ferðandi leggja ov lítið av pengum eftir seg, serliga uttan fyri miðstaðarøkið
- Trýsta leigumarknaðin, so borgarar kunnu hava trupult við at finna ein bústað
- Tyngja bjargingarfeløgini kring landið

Bæði rís og rós skulu takast í álvara. Ein grundleggjandi fyritreyt fyri vælvirkandi ferðavinnu er, at flestu borgarar hava ta uppliving, at ferðavinnan gagnar samfelagnum og ikki ger seg inn á gerandislív, virksemi og umhvørvi. Vælvilji á staðnum og virðing frá ferðandi eru lyklaorð í eini vælvirkandi ferðavinnu. Tí skal Tórshavnar kommuna í sínum ferðavinnupolitikki altíð vísa fyrilit fyri trivnaðinum hjá borgarunum.

## 2.1 FERÐAVINNA OG BÚSKAPUR

Ferðavinnan hevur stóran búskaparligan týdning fyri flestu lond kring heimin. Júst hendan vinnan hevur serligar eginleikar at skapa arbeiði, tí stórur partur av virkseminum má gerast av menniskjum og ikki tólum.

Eisini hevur ferðavinnan eina týðandi vakstrarávirkan, sum gevur virksemi og størv í øðrum vinnugreinum. Mett verður, at eitt starv í sjálvari ferðavinnuni skapar umleið 1,5 størv í avleiddum virksemi. Í 2019 stóð ferðavinnan fyri 10% av størvunum kring heimin,[2] og hon stóð fyri 10,4% av heimsins bruttotjóðarframleiðslu (GDP).

Í Danmark hevði ferðavinnan oman fyri 171.000 fulltíðarstørv í 2019 – tá eru avleiddar vinnur eisini íroknaðar.[3] Í Noregi starvaðust 168.700 fólk í ferðavinnuni í 2018, og hetta svarar til, at 7% av norsku arbeiðsmegini starvast í ferðavinnuni.[4]

Í Føroyum hava vit ikki nóg neyv tøl fyri at lýsa týdningin av ferðavinnuni í búskapinum og sum kunnu samanberast við ferðavinnutøl í øðrum londum. Eisini manglar okkum hagtøl fyri leiklutin hjá ferðavinnuni í kommunalu búskapunum.[5] Hagstovan hevur tó síðan 2014 kannað búskaparligu árinini av keypinum hjá útlendsku ferðafólkunum í Føroyum, men føroyingar eru ikki taldir við.

Í 2019 vóru 714 ársverk í inngangandi ferðavinnuni í Føroyum, og umsetningurin var 784 mió. kr. So kom koronufarsóttin og í kjalarvørrinum á henni avmarkingar í ferðavinnuni. Í 2021 lækkaði umsetningurin niður í 582 mió. kr. og 495 ársverk. Útvið helvtin av ársverkunum var innan fyri flutningsfyritøkur, ferðaskip og ferðaskrivstovur, og umleið 32% innan fyri matstovur, matvøruhandlar, drykkivørur og gistingarstøð.[6]

| | Umsetningur | Ársverk | Partur av fø. útflutningsvirði |
|---|---|---|---|
| **2011** | 384 mió. | 385 | 5,7% |
| **2018** | 731 mió. | 643 | 6,9% |
| **2019** | 784 mió. | 714 | 6,4% |
| **2020** | 313 mió. | 438 | 3,1% |
| **2021** | 582 mió. | 495 | Ikki tøkt enn |

Umsetningur og ársverk stavandi frá innkomandi ferðavinnu í 2011 og árini 2018–2021. Umsetningurin av Airbnb er ikki taldur við. Heldur ikki íløgur í gistingarhús (sum m.a. skapa arbeiði í byggivinnuni). Ársverk í útgangandi ferðavinnu eru heldur ikki tald við. Kelda: *Visit Faroe Islands Ársfrágreiðing 2021.*

2 https://www.unwto.org/world-tourism-day-2019

3 Turismens økonomiske betydning 2019, VisitDenmark 2021

4 Nøkkeltall om norsk turisme 2019, Innovasjon Norge

5 Hagstova Føroya arbeiðir við at menna eina skipan eftir altjóða leisti, Tourism Satellite Account (TSA), sum kann útvega neyvari tøl fyri búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í Føroyum.

6 Visit Faroe Islands Ársfrágreiðing 2021

Tølini vísa, at ferðavinnan er eitt gott íkast til føroyska búskapin við inntøkum og størvum. Vit kenna ikki kommunalu inntøkurnar av ferðavinnuni í Føroyum, men av tí at flestu gistingarhús og matstovur umframt fleiri ferðaskrivstovur og flutningsfyritøkur eru heimahoyrandi í Tórshavnar kommunu, kemur ein týðandi partur av ferðavinnuinntøkunum hendan vegin.

Ferðavinnan er við til at styrkja føroyska búskapin. Í dag er høvuðsgrundarlagið undir okkara búskapi fiskivinna og alivinna, tá ið vit tosa um útflutningsvirði. Við at menna ferðavinnuna kunnu vit fáa eitt týðandi triðja búskaparligt bein at standa á, sum ger land og kommunur munandi sterkari, um hóttafall skuldu rakt onkran part av vinnulívinum.

## 2.2 VIT TÍMA AT BÚGVA HER

Ein virðismikil partur av ferðavinnuni er, at hon fær okkum at trívast betur í okkara kommunu og landi.

Í samrøðunum, sum eru gjørdar í sambandi við hendan ferðavinnupolitikkin, nevna fleiri, at Havnin – og Føroyar sum heild – er vorðin eitt áhugaverdari stað at búgva seinastu árini. Her eru fleiri tiltøk at fara til, eitt nú festivalar, konsertir og onnur mentanartiltøk, og høvuðsstaðurin hevur fingið nógvar spennandi matstovur og kaffistovur. Ferðavinnan gevur matstovunum fíggjarligt grundarlag at hava opið alt árið, og tað er til gleði fyri okkum øll, sum búgva her.

Eisini siga fleiri, at møguleikin fyri bæði býarlívi og bygdalívi ger tað spennandi at búgva í Tórshavnar kommunu. Ja, tú kanst vera topptunaður akademikari í Havn, og løtu seinni ert tú á bønum ella einum fjallatindi. Og júst fjølbroyttu møguleikarnir við býarlívi, spennandi matstovuupplivingum og vakrari náttúru gera Tórshavnar kommunu til eitt áhugavert ferðamál hjá útlendskum ferðafólkum.

> „Ferðavinnan hevur virkuliga gjørt okkurt við at venda hugburðinum og fáa fólk at tíma at vera her“
> – *Súsanna Samró, lesandi, 28 ár.*

At útlendingar koma hendanvegin í størri tali hevur eisini fingið føroyingar at síggja okkara land og bý við nýggjum eygum. Í tilgongdini at vísa okkara land fram og greiða frá okkara siðum gerast vit ernari av okkara fiski, ræsta kjøti, máli, grønu líðum, brøttu fjøllum og mentan.

## 2.3 FØROYINGAR FERÐAST EISINI

Ein onnur orsøk til at fevna ferðavinnuna er, at vit, føroyingar sjálvir, hava góðan ferðingarhug.

Vit ferðast nógv úti í heimi: Til sól og all-inclusive-gistingarhús á Gran Canaria. Gongutúrar í italsku fjøllunum. Stórbýarmentan í London. Fjakka í Nepal. Sjoppa á Laugarvegnum í Reykjavík og vitja Bláa Lón. Skíðferð í Alpunum. Cruise í Miðjarðarhavinum. Bara fyri at taka nøkur dømi úr rúgvuni.

Talið á ferðandi um flogvøllin er støðugt økt seinastu árini (tó undantikið árini við koronufarsóttini) og setti met í 2019. Fleiri útlendingar eru komnir hendanvegin at ferðast, men føroyingar eru sjálvir farnir at ferðast meira. Taka vit trý tey seinastu árini, síggja vit, at føroyingar og føroyskir útisetar telja eina góða helvt av teimum ferðandi um flogvøllin í Vágum.

| Ár | Ferðandi loftvegis | Føroyingar + føroyskir útisetar | Útlendingar |
|---|---|---|---|
| **2019** | 419.021 | 53% | 47% |
| **2020** | 176.439 | 55% | 45% |
| **2021** | 239.085* | 52% | 48% |

Ferðandi um flogvøllin 2019–2021 býtt á tjóðskap.
*Íroknað ferðandi loftvegis í 2021 eru eisini ferðandi við tyrluni hjá Atlantic Airways av flogvøllinum í Vágum. Hetta talið er mett at liggja um 1.500–2000 í 2021.
*Kelda: Hagstova Føroya, Vága Floghavn og Atlantic Airways.*

Í flestu førum gongur leiðin til Danmarkar, og so ferðast fólk víðari út í heim haðani. Eisini dámar føroyingum væl at ferðast beinleiðis suður í heitari lond. Tøl hjá Atlantic Airways vísa, at sonevndu sólruturnar beinleiðis úr Føroyum til eitt nú Gran Canaria og Mallorka eru vælumtóktar. Frá 2015–2019 vóru væl oman fyri 9.000 ferðandi á sólrutunum árliga.

| 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2.629 | 3.361 | 5.568 | 9.361 | 9.490 | 10.873 | 11.035 | 10.464 |

Ferðandi á sólrutum hjá Atlantic Airways til Barcelona (2012-), Mallorka (2015-) og Gran Canaria (2016-). Harumframt hevur verið flogið til Kreta, Malta, Lissabon og onnur støð í styttri tíðarskeið. Flestu ferðandi á hesum rutum eru frítíðarferðandi búsitandi í Føroyum. Talan er um einvegis ferðandi.
*Kelda: Atlantic Airways*

Føroyingar í hópatali njóta sostatt gott av gestablídni, náttúru og býarlívi í øðrum londum. Tí eigur tað ikki at koma óvart á okkum, at útlendingar eisini hava hug at síggja okkara land og njóta okkara gestablídni.

## 3. STØÐAN Í FERÐAVINNUNI Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Vit fara í hesum partinum at lýsa verandi støðu hjá ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu.

Sum áður nevnt er avmarkað við ferðavinnuhagtølum í Føroyum, og serliga tá ið tað snýr seg um kommunal/lokal hagtøl. Tí er trupult at siga heilt neyvt í tølum, hvussu ferðavinnan í Tórshavnar kommunu hevur tað. Men við støði í samrøðum og teimum tølum, sum eru til taks, fara vit at gera eina roynd at lýsa støðuna hjá ferðavinnuni í kommununi.

Heilt yvirskipað kann sigast, at kommunan er væl fyri at taka ímóti ferðafólki, og allarflestu ferðafólk, sum koma til Føroya, vitja í Tórshavnar kommunu í styttri ella longri tíðarskeið.

Tað er í Havn, at tær størstu ferðavinnufyritøkurnar í landinum eru. Her eru flestu matstovurnar, gistingarhúsini, kaffistovurnar og eitt livandi náttarlív. Í høvuðsstaðum eru fleiri av stóru mentanarstovnunum, sum draga ferðandi til sín, t.d. Listasavnið, Tjóðsavnið og Norðurlandahúsið. Í kommununi eru fleiri forvitnislig søgulig støð sum eitt nú Tinganes, Skansin og øll fornminnini í Kirkjubø. Og Havnin er heimstaður hjá okkara løgtingi og landsstýri.

Vit hava fleiri vakrar bygdir og oyggjar. Nógvar hava ferðavinnuvirksemi, eitt nú túrar í náttúruni, heimablídni, vitjan á gørðum og útferðir á sjónum. Í kommununi eru hýruvognar, bussfyritøkur, handlar, gallarí og listafólk, ið selja føroyska sniðgeving og listhandverk.

Tórshavnar kommuna hevur sostatt eitt fjølbroytt tyssi av tilboðum til bæði útlendsk og føroysk ferðafólk, og sum heild er kommunan væl fyri at taka ímóti ferðafólki.

Flestu ferðafólkini, sum koma til Føroya, vitja høvuðsstaðin. Ein kanning hjá Gallup fyri Visit Faroe Islands vísir, at 95,4% av ferðafólkunum, sum vóru í Føroyum í 2018, vitjaðu í Havn. Til sammetingar vitjaðu 62,1% í Klaksvík, 61,5% við Gjógv, 57,8% í Saksun og 31% í Mykinesi.[7]

Sama kanning vísir eisini, at 93% av ferðafólkum brúktu pengar í Havn. 43,3% brúktu pengar í ávikavist Klaksvík, Runavík og á Tvøroyri, og 41,8% keyptu okkurt í smáu bygdunum sum t.d. Saksun, Gjógv og Tjørnuvík.

7 Visit Faroe Islands Ársfrágreiðing 2021. Gallup-kanningin frá 2018 er nýggjasta, stóra ferðafólkakanningin, sum er gjørd fyri VFI.

Tórshavnar kommuna brúkar á hvørjum ári fitt av pengum til ferðavinnu. Á fíggjarætlanini fyri 2022 eru settar 2,3 mió. kr. av til ferðavinnu – av hesum fara 2 mió. kr. til MICE-samstarvið (vinnuferðavinnusamstarvið). Harumframt játtar kommunan Visit Tórshavn 3,46 mió. kr. og Visit Nólsoy 400.000 kr.

Umframt hetta verður játtaður peningur til stuðulsmøguleikar á mentanarøkinum, og íløgur verða gjørdar, sum hava týdning fyri ferðavinnuna, m.a. játtanir til orkupolitikkin og til at fremja lív í býnum.

### 3.1 KORONUAVBJÓÐINGAR

Tað ber ikki til at tosa um støðuna í ferðavinnuni uttan at nevna koronufarsóttina. Eins og aðrastaðni í heiminum hevur føroyska ferðavinnan verið sera hart rakt av ferðaavmarkingunum, sum byrjaðu í mars 2020. Hetta hevur ávirkað gistingarhús, matstovur, søvn, ferðaleiðarar, flutningsfyritøkur – ja, øll sum starvast í ferðavinnuni.

Løgtingið samtykti tveir hjálparpakkar til ferðavinnuna: Hjálparpakki 3 var galdandi frá 12. mars 2020 til 31. august 2020, og Hjálparpakki 4 fevndi um tíðina 1. september 2020 til 31. mai 2021. Fevnd av hjálparpakkunum vóru hesir bólkar:

- Gistingarhús
- Matstovur
- Ferðaskrivstovur
- Fyriskipaðir túrar
- Ferðafólkaflutningur

Fleiri av ferðavinnufyritøkunum í kommununi, sum arbeiðsbólkurin hevur tosað við í sambandi við ferðavinnupolitikkin, siga, at korona rakti sera hart.

> „Vit høvdu farið í gjaldssteðg, um vit ikki fingu hjálparpakkar.“
> *– Ferðavinnufyritøka í Havn um koronutíðina.*

Sum dømi sigur ein ferðavinnufyritøka, at tey í 2020 høvdu bara 12% av umsetninginum sammett við 2019, og at umsetningurin fyri 2021 væntandi fór at liggja á umleið 40% av umsetninginum í 2019. Ein onnur fyritøka nevnir, at teirra virksemi fór niður í ein triðing undir koronu.

Nakrar fyritøkur gera greitt, at tær høvdu farið av knóranum uttan hjálparpakkar, og summar vísa á, at tær neyvan megna eina sesong aftrat við koronuavmarkingum.

Eisini verður nevnt, at føroysku hjálparpakkarnir vóru alt ov smáir, og at myndugleikarnir bóru ov seint at við teimum. Summar av smærru fyritøkunum siga, at tær søktu ikki úr hjálparpakkunum, m.a. tí tær hildu treytirnar vera so fløkjasligar, og at hetta kravdi ov nógv pappírsarbeiði.

TAKS upplýsir, at tilsamans 62 mió. kr. eru latnar í stuðuli til ferðavinnuna í hjálparpakkunum 3 og 4.

| | Upphædd í krónum | Tal á fyritøkum |
|---|---|---|
| **Hjálparpakki 3** | 22 mió. | 44 |
| **Hjálparpakki 4** | 40 mió. | 30 |

Upphæddir goldnar gjøgnum Hjálparpakka 3 og 4 og tal á fyritøkum, ið fingu stuðul. *Kelda: TAKS.*

TAKS upplýsir ikki, hvørjar fyritøkur hava fingið stuðul úr hjálparpakkunum. Tí vita vit ikki, hvussu nógvar fyritøkur í Tórshavnar kommunu hava fingið úr hjálparpakkunum og hvussu nógv. Flestu gistingarhúsini, matstovurnar og stóru ferðavinnufyritøkurnar eru heimahoyrandi í Havn, og tí er nærliggjandi at hugsa, at flestu pengarnir úr hjálparpakkunum eisini eru endaðir her.

Størsta einstaka upphæddin latin úr Hjálparpakka 3 er 10 milliónir krónur, meðan størsta einstaka upphæddin úr Hjálparpakka 4 er knappar 11 milliónir.

Korona ávirkar so at siga øll ferðavinnuhagtølini seinastu tvey árini. Tá ið vit á næstu síðunum hyggja at hagtølum fyri ferðavinnuna í høvuðsstaðnum og landinum sum heild, gongur greitt ígjøgnum allarflestu tølini, at tey eru broytt til tað verra í 2020 og 2021 orsakað av koronufarsóttini.

## 3.2 ØKT TAL AV FERÐANDI

Síggja vit burtur frá árunum við koronufarsóttini, hevur ferðavinnan í Føroyum ríettiliga tikið dik á seg. Tað sæst serliga í talinum á ferðandi um flogvøllin í Vágum, sum nærum tvífaldaðist frá 2012 til 2019. Knappliga helvtin av teimum loftvegis ferðandi í 2019 og 2020 vóru útlendingar.

Eisini ferðafólkatalið sjóvegis (við Norrønu) øktist nakað, tó ikki so nógv sum loftvegis.

| Ár | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tils.** | **270.409** | **283.279** | **296.156** | **322.476** | **340.910** | **387.047** | **424.603** | **472.877** | **202.280** |
| Loftvegis | 219.835 | 234.088 | 245.807 | 273.426 | 288.562 | 336.858 | 373.350 | 419.021 | 176.493 |
| Sjóvegis | 50.574 | 49.191 | 50.349 | 49.050 | 52.348 | 50.189 | 51.253 | 53.856 | 25.787 |

Ferðafólkaflutningur millum Føroyar og útlond loft- og sjóvegis 2012-2020. Einvegis ferðandi. Cruise-ferðafólk eru ikki íroknað. *Kelda: Hagstova Føroya.*

Hagstovan hevur ikki endaligu tølini fyri *samlaða* ferðafólkaflutningin í 2021, men tølini hjá Vága Floghavn siga, at tað fóru knapt 240.000 fólk um flogvøllin í fjør. Sostatt gjørdist 2021 eitt væl betri ár enn 2020. Og tølini um flogvøllin higartil í 2022 benda eisini á, at ferðingin er farin at mennast aftur, tó at tølini verri enn so líkjast teimum, sum vóru beint áðrenn koronufarsóttina.

**Cruise**

Umframt ferðandi um flogvøllin og við Norrønu koma ferðafólk eisini hendanvegin við cruiseskipi. Ferðafólkini gista umborð, og skipið steðgar vanliga ein dag í Føroyum. Ferðafólkini eru í landi í miðal í 4-6 tímar. Flestu cruiseskipini, sum koma til Føroya, leggja at í Havn.

| **Ár** | **2013** | **2014** | **2015** | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Skip** | 49 | 51 | 71 | 42 | 50 | 43 | 51 | 1 | 3 |
| **Ferðafólk** | 44.316 | 50.304 | 61.227 | 26.679 | 39.000 | 38.805 | 35.524 | 1.154 | 49 |

Tal á cruiseskipum og ferðafólkum í Føroyum frá 2015–2021. *Kelda: TAKS og Hagstova Føroya.*

Talið á cruiseskipum til Føroya er økt eftir aldarskiftið og hevur síðani flestu árini ligið millum 40 og 50 skip. Størsta tal var í 2015, tá ið 71 skip vitjaðu. So samanumtikið er talið á cruiseskipum økt, men hevur tó hildið seg á eini nøkulunda javnari legu seinastu árini – undantikið síðstu tvey árini við koronu. Í ár koma væntandi umleið 50 cruiseskip á Havnina.

## 3.3 FLEIRI KØMUR

Tórshavnar kommuna er seinastu árini vorðin betri fyri at hýsa ferðafólki. Gistingarhúskapasiteturin er meira enn tvífaldur, m.a. tí at tvey nýggj gistingarhús, Hotel Brandan og Hilton Garden Inn Faroe Islands, lótu upp í 2020, og onnur eru útbygd.

Í 2021 vóru 83% av øllum gistingarhúskømurum í Tórshavnarøkinum.

| | 2013 | 2021 |
|---|---|---|
| **Kømur tilsamans** | **396** | **743** |
| Tórshavnarøkið | 277 | 619 |
| Uttan fyri Tórshavnarøkið | 119 | 124 |

Kømur á gistingarhúsum í Føroyum pr. 1.januar í ávikavist 2013 og 2021. *Kelda: Hagstova Føroya.*

Tann 1. januar 2013 vóru 396 gistingarhúskømur í Føroyum – av hesum 277 í Tórshavnarøkinum. Tann 1. januar 2021 var talið á kømurum 743, altso nærum tvífaldað. Av hesum vóru 619 kømur í Tórshavnarøkinum.




Kømur á gistingarhúsum í Føroyum pr. 1.januar 2013 til 1. januar 2021. *Kelda: Hagstova Føroya.*

Gistingarhúsvinnan í Tórshavnar kommunu er sostatt munandi betur fyri at taka ímóti ferðandi í dag enn fyri bert fáum árum síðan.

### 3.4 FLEIRI GISTINGAR OG LONGRI SESONG

Í hagtølunum fyri gistingar síggja vit, at gistingarnar á gistingarhúsunum í Tórshavnarøkinum øktust øll árini fram til 2019. Eftir eitt sera soltið 2020 orsakað av koronu, øktist talið munandi í 2021 og setti met við oman fyri 157.000 persónsgistináttum.

Tað sama ger seg ikki galdandi fyri gistingarhúsini uttan fyri Havnina, har talið á gistingum framvegis er lágt í 2021 – minni enn helvtina av tí, tað var í 2015.

Gestirnir í Havn gista 2,5 nætur í miðal, meðan teir á gistingarhúsum uttan fyri Havnina gista 2,0 nætur í miðal.

| | Øki | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Persóns-gistinætur | Tórshavnarøkið | 84.395 | 88.063 | 101.207 | 107.500 | 126.044 | 82.139 | 157.293 |
| | Uttan fyri Tórshavnarøkið | 34.490 | 40.668 | 43.419 | 45.613 | 40.408 | 12.801 | 16.620 |
| Innskrivingar | Tórshavnarøkið | 31.337 | 34.700 | 40.172 | 43.300 | 50.764 | 35.041 | 63.765 |
| | Uttan fyri Tórshavnarøkið | 19.574 | 20.480 | 22.659 | 20.894 | 21.189 | 5.995 | 8.450 |
| Nætur í miðal | Tórshavnarøkið | 2,7 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,5 | 2,3 | 2,5 |
| | Uttan fyri Tórshavnarøkið | 1,8 | 2,0 | 1,9 | 2,2 | 1,9 | 2,1 | 2,0 |

Persónsgistinætur, innskrivingar og nætur í miðal á gistingarhúsum í Tórshavnarøkinum og uttan fyri Tórshavnarøkið frá 2015–2021.[8] *Kelda: Hagstova Føroya.*

Tølini fyri innskrivingar vísa, at flestu ferðafólkini á føroysku gistingarhúsunum eru úr Føroyum og Danmark.

| | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Tils. (bústaðarland)** | 47.849 | 42.599 | 50.911 | 55.180 | 62.831 | 64.194 | 71.953 | 41.036 | 72.215 |
| **Føroyar** | 16.769 | 13.839 | 16.957 | 18.518 | 18.863 | 20.950 | 19.627 | 20.675 | 36.826 |
| **Danmark** | 15.427 | 13.506 | 15.864 | 17.249 | 17.377 | 15.785 | 17.968 | 12.621 | 21.509 |
| **Norðurlond annars** | 5.987 | 6.851 | 7.656 | 7.848 | 9.560 | 10.329 | 11.052 | 2.508 | 4.093 |
| **Evropa** | 5.889 | 5.969 | 8.210 | 9.236 | 13.640 | 11.942 | 16.184 | 4.276 | 8.305 |
| **Asia** | 153 | 214 | 241 | 442 | 789 | 1.455 | 1.898 | 143 | 150 |
| **USA** | 413 | 448 | 1.133 | 1.342 | 1.740 | 2.402 | 3.883 | 600 | 999 |
| **Rest** | 3.211 | 1.772 | 850 | 545 | 862 | 1.331 | 1.341 | 213 | 333 |

Innskrivingar á føroysku gistingarhúsunum 2013–2021 skift á bústaðarland. *Kelda: Hagstova Føroya.*

Tað er greitt, at føroyingar – og partvís danir – eiga lívið í føroysku gistingarhúsunum koronuárini 2020 og 2021.

Gistingarhúsini gjørdu stórar lýsingarherferðir vendar móti føroyingum, og helmingurin av innskrivingunum hesi bæði árini eru við føroyingum. Hetta vísir, at tað eru óroyndir møguleikar í innanlendis ferðavinnuni, sum ikki skulu undirmetast.

Lutfalsligi parturin av donskum ferðafólkum øktist eisini undir koronu. Danir áttu 31% av innskrivingunum á føroysku gistingarhúsunum í 2020 og 30% í 2021. Hinvegin minkaði talið á ferðafólkum úr londum uttan fyri Danmark nógv. Tilsamans áttu føroyingar og danir góðar fýra av fimm innskrivingum á gistingarhúsunum í 2020–2021.

8 Persónsgistinætur telja, hvussu nógvir og hvussu leingi persónar gista. Um 10 fólk gista 3 nætur, eru hetta 30 persónsgistinætur. Innskrivingar telja, hvussu nógvar innskrivingar eru. Um 10 fólk skriva seg inn, eru hetta 10 innskrivingar, sama hvussu leingi tey gista.

| Bústaðarland | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|
| Føroyar | 33 | 27 | 50 | 51 |
| Danmark | 25 | 25 | 31 | 30 |
| Onnur Norðurlond | 16 | 15 | 6 | 6 |
| Evropa | 19 | 22 | 10 | 12 |
| Onnur lond | 8 | 10 | 2 | 1 |

Prosentbýtið av innskrivingum á føroyskum gistingarhúsum skift á bústaðarland árini 2018–2021.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

**Gistitalið betrað**

Tað hevur eisini eydnast at økja um gistitalið (belegningin) á gistingarhúsunum seinastu árini og at fáa gistingarnar breiddar yvir eitt alsamt longri tíðarskeið á árinum. Taka vit kamarsnætur í mun til kømur, so var gistitalið í 2013 43,7% í miðal fyri alt landið. Talið er alsamt hækkað, og í 2019 var tað 59,1%. Árini 2020 og 2021 var talið lægri, tá ið koronufarsóttin herjaði.[9]

| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2013** | 19,6 | 31,8 | 31,6 | 39,1 | 55,5 | 70,6 | 69,8 | 62,6 | 58,4 | 37,3 | 30,8 | 17,0 | **43,7** |
| **2014** | 20,2 | 30,3 | 37,5 | 33,5 | 56,9 | 69,0 | 75,0 | 63,8 | 62,1 | 35,3 | 30,1 | 17,6 | **44,3** |
| **2015** | 24,2 | 30,1 | 38,2 | 34,4 | 54,9 | 70,4 | 75,2 | 75,2 | 56,5 | 41,8 | 34,7 | 16,1 | **46,0** |
| **2016** | 19,4 | 29,2 | 35,7 | 50,2 | 61,5 | 77,4 | 76,6 | 75,2 | 57,0 | 39,5 | 34,9 | 18,6 | **47,9** |
| **2017** | 30,5 | 30,7 | 38,9 | 50,6 | 70,9 | 77,9 | 81,4 | 78,6 | 67,5 | 50,3 | 42,9 | 19,5 | **53,3** |
| **2018** | 26,9 | 34,0 | 49,5 | 61,6 | 76,8 | 85,7 | 84,4 | 87,0 | 70,4 | 45,5 | 41,5 | 20,8 | **57,0** |
| **2019** | 27,7 | 31,9 | 44,1 | 58,9 | 74,6 | 88,0 | 90,4 | 88,7 | 74,8 | 61,5 | 45,7 | 23,2 | **59,1** |
| **2020** | 25,2 | 35,1 | 24,4 | 8,4 | 16,7 | 25,3 | 63,5 | 51,8 | 40,1 | 32,6 | 26,1 | 17,2 | **30,5** |
| **2021** | 16,6 | 23,5 | 28,5 | 38,6 | 30,9 | 46,7 | 76,5 | 70,8 | 62,5 | 48,1 | 35,2 | 26,8 | **42,1** |
| **2022** | 22,0 | 30,9 | 38,8 | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | **30,6** |

Nýtslustig (belegningur) á gistingarhúsum í Føroyum skift á mánaðir frá 2013 til 2022. Kelda: Hagstova Føroya.

Gistitalið í Suðurstreymoy er lutfalsliga hægri enn fyri restina av landinum. Her var gistitalið 48,7% í 2013 og 67% í 2019.

| | Jan | Feb | Mar | Apr | Mai | Jun | Jul | Aug | Sep | Okt | Nov | Des | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **2013** | 19,8 | 33,4 | 35,9 | 42,4 | 62,1 | 78,1 | 76,6 | 70,1 | 68,3 | 42,8 | 34,5 | 20,1 | **48,7** |
| **2014** | 21,5 | 33,1 | 45,5 | 38,3 | 67,2 | 76,3 | 85,7 | 72,5 | 70,8 | 40,2 | 34,3 | 19,4 | **50,4** |
| **2015** | 25,9 | 34,3 | 45,4 | 40,7 | 62,5 | 74,2 | 79,8 | 80,7 | 63,0 | 47,2 | 35,5 | 16,5 | **50,5** |
| **2016** | 17,6 | 27,0 | 38,9 | 52,7 | 65,8 | 84,5 | 84,7 | 81,0 | 65,6 | 43,9 | 36,4 | 19,2 | **51,4** |
| **2017** | 27,2 | 29,2 | 42,2 | 58,7 | 80,9 | 86,0 | 87,6 | 84,1 | 79,3 | 62,2 | 48,5 | 19,5 | **58,8** |
| **2018** | 25,9 | 34,6 | 56,3 | 65,5 | 80,8 | 90,1 | 87,8 | 92,3 | 78,3 | 48,2 | 45,9 | 21,6 | **60,6** |
| **2019** | 29,5 | 35,4 | 53,4 | 65,8 | 85,0 | 93,3 | 95,9 | 95,6 | 88,5 | 77,4 | 55,0 | 29,2 | **67,0** |
| **2020** | 30,1 | 41,8 | 27,3 | 8,3 | 21,7 | 30,0 | 68,3 | 54,5 | 43,8 | 35,5 | 27,9 | 19,0 | **34,0** |
| **2021** | 18,9 | 27,1 | 30,6 | 43,3 | 32,4 | 50,6 | 79,8 | 73,3 | 66,8 | 51,7 | 38,7 | 31,5 | **45,4** |
| **2022** | 24,5 | 34,1 | 41,6 | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | .. | **33,4** |

Nýtslustig (belegningur) á gistingarhúsum í Suðurstreymoy skift á mánaðir frá 2013 til 2022.
Kelda: Hagstova Føroya.

9 Visit Faroe Islands. Ársfrágreiðing 2021.

Í yvirlitinum yvir einstøku mánaðirnar sæst, at alsamt fleiri vitja gistingarhúsini uttan fyri vanligu háárstíðina, sum er á hásumri. Sesongin er altso longd. Í 2013 var gistitalið í Suðurstreymoy oman fyri 50% í tilsamans fimm mánaðir á árinum, nevniliga frá mai til september. Í 2019 var hetta galdandi fyri heilar níggju mánaðir – frá mars til november. Til dømis var gistitalið 34,5% í november 2013, men í november 2019 var tað økt til 55%.

### 3.5 ONNUR GISTING

Ikki øll ferðafólk, sum koma hendan vegin, fara á gistingarhús. Tað eru aðrir møguleikar at gista, t.d. Airbnb, kampingpláss, frítíðarhús og privat gisting.

Tað finnast í løtuni ikki neyv hagtøl fyri hesi sløg av gisting. Hagstova Føroya hevur áður gjørt upp gistingar fyri m.a. frítíðarhús og kamping, men hevur avgjørt at steðga við tí fyribils, tí tað hevur ikki borið til at fáa nóg álítandi tøl fyri hetta virksemið.

**Airbnb**

Eitt slag av gisting, sum hevur vundið nógv upp á seg seinnu árini, er Airbnb. Í ferðafólkakanningini hjá Gallup fyri VFI í 2018 søgdu 38,9% av teimum spurdu, at tey leigaðu hús ella íbúð gjøgnum Airbnb, meðan 32,5% gistu á gistingarhúsi. Hetta var áðrenn gistikapasiteturin øktist í Føroyum, tí fleiri av ferðafólkunum søgdu seg velja Airbnb, tí tað ikki var pláss á gistingarhúsunum.[10]

Kanningar hjá TAKS vísa, at við árslok 2018 vóru 551 føroyskir bústaðir skrásettir hjá Airbnb, og at samlaði umsetningurin av Airbnb-útleigan hetta árið var 21,9 mió. krónur. Ongin uppgerð er gjørd síðan 2018.

TAKS fær ikki upplýsingar um leigumál beinleiðis frá Airbnb. Eftirlitsfólk hjá TAKS mugu tí finna upplýsingar um Airbnb-útleigan á annan hátt.

Ein leyslig gjøgnumgongd á heimasíðuni hjá Airbnb í mars 2022 vísir, at áleið 250 gistingarstøð eru skrásett at vera í Tórshavnar kommunu. Flestu teirra í Havn, Hoyvík og á Argjum. Tað er ógreitt, hvussu stórt samlaða talið á Airbnb-bústøðum í Føroyum er í dag.

**Kamping**

Nøkur av teimum, sum vitja í høvuðsstaðnum, gista á kampingplássinum Yviri við Strond. Í 2021 var kampingplássið opið frá 1. mai til 18. oktober, og hesa tíðina gistu tilsamans 1.859 fólk á plássinum.

10 Visit Faroe Islands. Ársfrágreiðing 2021.

| Slag av gisting | Eindir | Fólk |
|---|---|---|
| Kampingpláss (kampingvognar og autokamparar) | 597 | 1.244 |
| Tjaldingarpláss | 358 | 615 |
| **Tilsamans** | **955** | **1.859** |

Gisting á kampingplássinum Yviri við Strond í 2021. *Kelda: Visit Tórshavn.*

## 3.6 STØRRI LØNARGJALDINGAR OG FLEIRI ÚTLENDSK STARVSFÓLK

So hvørt, sum talið á ferðandi er økt seinastu árini, eru eisini løngjaldingarnar í matstovu- og gistingarhúsvinnuni farnar sama veg. Í 2021 vórðu rindaðar góðar 178 mió. krónur í lønum í hesi vinnuni. Hóast 2021 var eitt „koronuár" settu lønar-gjaldingarnar á gistingarhúsum og matstovum met, meira enn 12 mió. fleiri enn í 2019, sum á nógvum økjum verður mett at vera størsta árið hjá ferðavinnuni.

Tó skulu vit vera varin við at seta líkheitstekn millum høgu løngjaldingarnar og tað, sum liggur eftir á botnlinjuni hjá gistingarhúsum og matstovunum. Fleiri arbeiðs-pláss hava undir koronufarsóttini roynt at varðveita eitt ávíst tal á starvsfólkum fyri at kunna hava tey í starvi, tá ið koronukreppan loksins var av.

| | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Bæði kyn** | 78,2 | 86,0 | 92,5 | 98,4 | 105,2 | 114,0 | 131,8 | 151,9 | 165,9 | 132,7 | 178,4 |
| **Mannfólk** | 31,8 | 34,1 | 36,3 | 37,2 | 39,5 | 44,7 | 54,2 | 66,8 | 71,3 | 61,1 | 78,5 |
| **Konufólk** | 46,5 | 51,9 | 56,3 | 61,2 | 65,7 | 69,3 | 77,7 | 85,1 | 94,6 | 71,6 | 99,8 |

Lønargjaldingar í gisti- og matstovuvinnuni 2011–2021. Kelda: Hagstova Føroya.




Lønargjaldingar í gisti- og matstovuvinnuni 2011–2021. *Kelda: Hagstova Føroya.*

Flestu gistingarhús og matstovur liggja í Havn, men vit vita ikki, hvussu stórur partur av teirra løntakarum búgva í Tórshavnar kommunu.

**Fleiri útlendingar í starvi**

Ein stór broyting er hend í starvsfólkahópinum á matstovum og gistingarhúsum seinastu árini. Í 2011 vóru 83 % av løntakarunum í hesi vinnuni fólk, sum vóru fødd í Føroyum, men í 2021 var hesin parturin minkaður niður í 67%. Tað vil siga, at uml. ein triðingur av teimum, sum starvast í gistingarhús- og matstovuvinnuni í dag, eru útlendingar.




Løntakarar á gistingarhúsum og matstovum í 2011 býtt á føðiland og ríkisborgaraskap.
*Kelda: Hagstova Føroya.*




Løntakarar á gistingarhúsum og matstovum í 2021 býtt á føðiland og ríkisborgaraskap.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Stórir partar av vinnulívinum hava í langa tíð manglað arbeiðsmegi. Hetta er eisini galdandi fyri gistingarhús- og matstovuvinnuna. Okkurt tíðarskeið hevur trotið á arbeiðsmegi verið so stórt, at matstovur hava avmarkað upplatingartíðirnar, og á onkrum gistingarhúsi hava tey okkurt tíðarskeið avmarkað talið á útleigaðum kømurum, tí tey hava manglað reingerðarfólk.

Vinnulívið í Føroyum hevur í alt størri mun leitað sær út um landoddarnar at finna arbeiðsmegi, og í november 2021 kom í gildi ein skipan, sum ger tað lættari hjá arbeiðsgevarum at fáa arbeiðsmegi úr londum uttan fyri ES.

Fleiri vinnurekandi í ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu hava ynski um, at myndugleikarnir raðfesta ferðavinnuútbúgvingar í Føroyum, m.a. móttøkufólk og event management, umframt fokus á tænara- og kokkaútbúgving. Á tann hátt gerst ferðavinnan sjónligari sum yrkismøguleiki hjá føroyskum ungdómi, gevur professjonellari umhvørvi og kann fáa starvsfólk at støðast betur.

## 3.7 MEST FRÍTÍÐARFERÐANDI

Hvat eru tað so fyri ferðafólk, sum koma hendan vegin at vitja? Ofta verður skilt ímillum frítíðarferðandi og starvsferðandi, tað vil siga fólk sum vitja Føroyar, tí tey eru í arbeiðsørindum, luttaka á ráðstevnu o.l.

Taka vit tølini fyri innskrivngar á gistingarhúsunum, so fevnir oman fyri helmingurin av innskrivingunum á gistingarhúsunum um frítíðarferðandi, men prosentparturin av starvsferðandi sær út til at økjast spakuliga. Árini frá 2018–2020 stóðu vinnuferðandi fyri yvir 40% av innskrivingunum á gistingarhúsunum.

| Ár | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Frítíðarferð | 55 | 62 | 69 | 72 | 59 | 58 | 56 | 69 |
| Starvsferð | 45 | 38 | 31 | 28 | 41 | 42 | 44 | 31 |

Prosentpartur av innskrivingum á gistingarhúsum í Føroyum býtt á ávikavist frítíðarferðir og starvsferðir.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Her skulu vit geva gætur, at býtið er gjørt við støði í hagtølum fyri innskrivingar á gistingarhúsum í Føroyum. Vit kenna ikki øll tølini fyri gistingar í Føroyum, við tað at gistingarhættir sum Airbnb ikki eru fevndir av uppgerðini hjá Hagstovuni.

## 3.8 FERÐAFÓLKAKANNNING Í 2019

Árið 2019 var seinasta „vanliga“ ferðavinnuárið áðrenn koronu. Á sumri 2019 gjørdu VFI, Visit Tórshavn og Tórshavnar Havn eina ferðafólkakanning av ferðandi við flogfari, Norrønu og cruiseskipum. Her eru nøkur hagtøl úr kanningini:

- Miðalaldurin á teimum ferðandi er 52 ár
- Náttúran er høvuðsorsøkin til vitjanina í Føroyum
- Ferðafólkini gista í meðal 4,7 nætur í Føroyum. Ferðandi um flogvøllin gista 6,3 nætur, ferðandi við Norrønu 5 nætur og cruise-ferðandi 1,1 dag
- Tey ferðandi geva karakterin 4,7 av 5 fyri nøgdsemi við upplivingar í Føroyum
- Keypsmøguleikarnir í Tórshavn fáa karakterin 4,1. Tænastustigið í handlum, matstovum og kaffistovum fær 4,4
- Ferðandi ynskja betri kunning um tørvin at bíleggja pláss á matstovum frammanundan. Fleiri endaðu á burgarabarr, tí onki pláss var á matstovum
- 2% av ferðafólkum um flogvøllin og 2% av ferðafólkum við Norrønu høvdu ikki brúkt pengar seinasta samdøgrið, meðan 31% av ferðandi við cruiseskipi høvdu ikki brúkt pengar seinasta samdøgrið*
- Ferðandi sakna vanligar matstovur við meðalprísi
- Ferðandi sakna felags leist viðvíkjandi atgongd til náttúruna

*Fleiri av cruiseferðafólkunum søgdu seg vilja keypa føroysk ting og høvdu reiðan pening við, men fingu ikki keypt vegna vantandi tíð ella av øðrum orsøkum.

Samanumtikið er Tórshavnar kommuna munandi betri fyri at hýsa ferðafólki í dag enn fyri fáum árum síðan, tí kapasiteturin á gistingarhúsunum er meira enn tvífaldaður. Talið á gistingum er økt ár undan ári, og við økta kapasitetinum krevst sjálvandi eisini, at gistingarnar økjast í tali.

Gistitalið er eisini økt, og gistingarnar fevna nú um ein størri part av árinum. Undir koronukreppuni í 2020 og 2021 áttu føroyingar helvtina av gistingunum á føroysku gistingarhúsunum. Gistihagtølini eru ikki nóg fullfíggjað, m.a. tí tað ikki ber til at fáa hagtøl frá Airbnb.

Lønargjaldingarnar í gistingarhús- og matstovuvinnuni eru øktar so líðandi seinasta 10 ára skeiðið, tó við eini minking í 2020. Parturin av útlendskum starvsfólkum í gistingarhús- og tænastuvinnuni er øktur, meðan parturin av føroyingum er minkaður. Og vinnurekandi í ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu ynskja sær fleiri ferðavinnuútbúgvingar í Føroyum, m.a. tí hetta kann gera tað meira lokkandi at arbeiða í ferðavinnuni.

## 4. BROYTTAR TREYTIR

Nógv er broytt, síðan Tórshavnar kommuna í 2017 fekk sín fyrsta ferðavinnupolitikk.

Hendar eru broytingar, sum seta krøv til førleikarnar at laga okkum til nýggjar umstøður, og sum krevja, at vit eisini vísa fyrilit fyri øðrum enn okkum, sum liva á hesum staði og í hesari tíð.

Hendar eru eisini broytingar, sum geva Føroyum – og Tórshavnar kommunu – nýggjar, spennandi møguleikar innan fyri ferðavinnu.

### 4.1 KORONA

Sum áður nevnt var ein av stóru, aktuellu avbjóðingunum koronufarsóttin, sum í stóran part av 2020 og 2021 legði ferðavinnuna kring allan heimin í dvala. Sambært UNTWO, ið er altjóða ferðavinnuráðið undir ST, var 2020 ringasta árið nakrantíð hjá ferðavinnuni. Tá lækkaði talið á ferðum um landamørk (international tourist arrivals) úr knapt 1,5 mia. í 2019 niður í 400 mió. Í 2021 hækkaði talið eitt vet upp í 415 mió. So í altjóða høpi hevur ferðavinnan hesi bæði árini bara verið ein viðfáningur av tí, hon kundi verið.

Eisini her í Føroyum merkti ferðavinnan stórar avleiðingar. Ferðavinnan um flogvøllin og sjóvegis minkaði niður í á leið eina helvt í 2020, bara okkurt hendinga cruiseskip hevur verið, og gistingarnar lækkaðu munandi. Farsóttin gjørdi okkum varug við, at hendingar knappliga kunnu koma, sum fullkomiliga broyta okkara treytir at liva og virka.

### 4.2 VEÐURLAGSBROYTINGAR OG TILVITAÐ FERÐANDI

Ein stór avbjóðing er veðurlagsbroytingarnar. Á heysti 2021 ávaraði ST-veðurlagsstovnurin, IPCC, aftur um ógvusligar avleiðingar av veðurlagsbroytingunum. Vit kunnu ikki longur forða fyri, at hitin á jørðini økist, men vit kunnu framvegis avmarka skaðan við at minka um útlátið av CO2 og øðrum vakstrarhúsgassum.

Hetta leggur stóra ábyrgd á politikarar, myndugleikar, vinnulív og borgarar um at hugsa um umhvørvið í øllum lutum – eisini tá ið tað snýr seg um ferðavinnuna. Hóast Føroyar hava samtykt at minka um útlátið av veðurlagsgassum, er tað bara økt seinastu árini.[11]

---

11 Sambært Umhvørvisstovuni var føroyska útlátið av CO2-eindum uml. 800-900 tons árliga árini 2001-2016. Í 2020 var tað 1,3 mió. CO2-eindir. 41% av útlátinum stava frá fiskiskipum og 14% frá el- og hitaframleiðslu.

Kanningar vísa, at ferðafólk eru meira tilvitað um umhvørvi og burðardygd,[12] og ferðavinnuaktørar í Tórshavnar kommunu nevna, at fólk í størri og størri mun spyrja um hesi viðurskifti. Burðardygd er eitt kappingarparametur, tá ið ferðamál bjóða seg fram innan fyri vinnuferðavinnu. Vit vita eisini, at serliga unga ættarliðið av borgarum og ferðandi leggur stóran dent á burðardygd og endurskapan.

Í nýggju ferðavinnustrategiini hjá Noregi[13] verður soleiðis tikið samanum avbjóðingina:

*„Reiselivsnæringen må forholde seg til både internasjonale og nasjonale reguleringer og bestemmelser, CO2-avgifter og prinsipper for ansvar (den som forurenser må betale). I tillegg kommer endringer i forbrukerpreferanser og betalingsvillighed når det gjelder grønne valg og reisevaner.“*

Nógv velja at ferðast við toki, tí tað gevur minni útlát. Hendan møguleikan kunnu Føroyar ikki bjóða, og tí mugu vit sum ferðamál gera eyka nógv burturúr umhvørvisvernd fyri at standa okkum í kappingini við onnur ferðamál.

## 4.3 ATFINNINGAR MÓTI FERÐAVINNU

Seinastu árini hava hugtøk sum yvirturisma og „fólkadálking“ verið nevnd í sambandi við ferðavinnu. Hesi snúgva seg um, at ferðavinnan leggur trýst á umhvørvið og gerandisdagin hjá íbúgvunum í summum ferðamálum. Í nøkrum evropeiskum býum, m.a. Barcelona og Venesia hava íbúgvar mótmælt ávirkanini frá teimum mongu vitjandi, og stig eru tikin til at bøta umstøðurnar. Eisini Reykjavík verður javnan nevndur sum ein býur, har býarmyndin er (ov) nógv ávirkað av útlendskum ferðandi.

Samlaða talið á ferðafólkum í Føroyum er nógvar ferðir minni enn í nevndu býum, men í summum økjum hava íbúgvar gramt seg um vitjanir av ferðafólki. Atfinningar eru m.a. at ferðafólk koma ov tætt upp á privatlívið hjá fólki í ávísum støðum og slíta upp á náttúru og umhvørvi.

Øll vinna hevur ávirkan á umhvørvi og menniskju, eisini ferðavinna. Sjálvsagt skal neilig ávirkan avmarkast í mest møguligan mun, um vit skulu bjóða okkum fram sum ferðavinnuland og -kommuna. Vit mugu stremba eftir at tryggja, at ferðavinnan hjá okkum er burðardygg umhvørvisliga, sosialt og fíggjarliga. Fyrimunurin hjá okkum sum lutfalsliga nýtt ferðamál er, at vit kunnu læra av øðrum og menna góðu loysnirnar, áðrenn trupulleikar av álvara stinga seg upp.

12 https://business.visitnorway.com/no/nyheter/2019/ny-rapport-er-barekraft-verdt-betale-for/

13 https://business.visitnorway.com/no/strategi-for-norsk-reiseliv/

## 4.4 TROT Á ARBEIÐSMEGI

Ein onnur avbjóðing í føroysku ferðavinnuni – og arbeiðsmarknaðinum sum heild – er trot á arbeiðsmegi. Arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt, og hetta hevur m.a. givið matstovum og gistingarhúsum trupulleikar at útvega fólk. Hjá summum við teirri avleiðing, at neyðugt hevur verið at skerja upplatingartíðirnar. Átøk eru gjørd at lætta um møguleikan at fá hendur á útlendskari arbeiðsmegi.

Umframt at ferðavinnan manglar tøkar hendur, er eisini trot á útbúnari arbeiðsmegi, og ferðavinnan vísir á, at neyðugt er at seta ferðavinnuútbúgvingar á stovn í Føroyum.

## 4.5 FÓLKATALIÐ ØKT

Hesa tíðina, síðan seinasti ferðavinnupolitikkur var skrivaður, hava vit havt stóra øking í fólkatalinum. Sambært tølum hjá Hagstovuni er fólkatalið økt við nærum 4.000 fólkum seinastu fimm árini. Tórshavnar kommuna eigur umleið helmingin av vøkstrinum.

| | **2017** | **2022** |
|---|---|---|
| **Alt landið** | 49.791 | 53.664 |
| **Tórshavnar kommuna** | 20.854 | 22.738 |

Fólkatal í ávikavist øllum landinum og Tórshavnar kommunu 1. januar 2017 og 1. januar 2022.
*Kelda: Hagstova Føroya.*

Vøksturin ber boð um, at Føroyar eru vorðnar eitt meira lokkandi land at búseta seg í, og at høvuðsstaðurin, sum hevur fingið áleið helvtina av økta íbúgvaratalinum, hevur stóra atdráttarmegi. Økt íbúgvaratal gevur fleiri skattainntøkur og arbeiðsmegi, men leggur samstundis eisini skyldur á land og bý við eitt nú bústøðum, skúlum, vegakervi, heilsutænastum og undirstøðukervi so sum vatn, kloakk og streym.

## 4.6 BETRI SAMFERÐSLUKERVI

Samferðslukervið í Føroyum er nógv ment seinastu árini, og har eru størstu frambrotini undirsjóvartunlarnir. Í desember 2020 læt Eysturoyartunnilin upp og knýtti Suðurstreymoy og Eysturoy saman, og í 2023 letur Sandoyartunnilin upp, sum knýtir Sandoy og Suðurstreymoy saman.

Tunlarnir geva stórar møguleikar innan fyri ferðavinnuna og lata eisini upp fyri øktum samstarvi millum økini í landinum. Til dømis samstarv við grannakommunurnar, tá ið Havnin er karmur um stórar ráðstevnur og ítróttarkappingar.

Hinvegin eru nøkur øki í landinum, sum lítlan og ongan bata hava havt á samferðsluøkinum. Koltur hevur onki alment ferðasamband, og hjá Hesti og Nólsoy er tørvur á betri sambandi.

## 4.7 ØKTIR GISTIMØGULEIKAR

Kapasiteturin at gista er munandi bøttur seinastu árini. Í Havn hava nýggj gistingarhús sæð dagsins ljós. Onnur gistingarhús hava fingið fleiri kømur og eru vorðin umvæld.

Talið á kømurum er í dag er oman fyri 600 í høvuðsstaðnum og er sostatt meira enn tvífaldað síðan 2019. Hetta ger kommununa nógv betri føra fyri at vera vertur fyri stórum tiltøkum, og hetta gagnar øllum landinum. Gistingarhúsini í høvuðsstaðnum eru sum heild á høgum stigi, og dentur verður í alt størri mun lagdur á grønar loysnir.

## 4.8 ALTJÓÐA UMRØÐA

Føroyar eru vorðnar sera sjónligar í alheims miðlum. Ein av fremstu ferðamiðlunum, Lonely Planet, valdi Føroyar sum eitt av heimsins fremstu ferðamálum í 2021. Grundgevingin var, at Føroyar raðfesta eina autentiska og persónliga ferðavinnu og áhaldandi halda seg frá hópferðavinnu.

Kreativu átøkini hjá Visit Faroe Islands hava givið nógva altjóða fjølmiðlaumrøðu og hava vunnið hópin av altjóða virðislønum.

Filmar sum James Bond og Trom hava eisini sett Føroyar á breddan. Rundkoyringin í Eysturoyartunlinum við eyðkenda listaverkinum hjá Tróndi Patursson gjørdi okkum heimskend. Harumframt eru lýsingarfilmar fyri bilmerkir eisini gjørdir í Føroyum.

Millum alla góðu umrøðuna er eisini vánalig. Stóra springaradrápið í september 2021 setti Føroyar á heimskortið við vánaligari umrøðu, og alivinnan hevur í miðlunum ávarað um, at hetta kann fáa víðfevndar avleiðingar fyri útflutningin. Eisini ferðavinnuaktørar siga seg óttast fyri neiligum avleiðingum av springaradrápum.

## 4.9 LÓGARKARMAR AT SKIPA VIRKSEMIÐ Í NÁTTÚRUNI

Seinastu árini hevur nógv kjak verið um viðurskifti í føroysku náttúruni, m.a. atgongdina til náttúruna og náttúruvernd. Fleiri hava víst á, at okkum tørvar lógarkarmar, sum skipa virksemið í náttúruni.

Skiftandi landsstýri hava arbeitt við at fáa eina náttúruverndarlóg at verja og fyrisita lívfrøðiliga margfeldið í náttúruni. Kring heimin eru nógv djóra- og plantusløg hótt, og eisini í Føroyum er vandi á ferð. Føroyar hava bundið seg til ST-sáttmálan at verja náttúrumargfeldið,[14] og mett verður, at gamla náttúrufriðingarlógin frá 1970 als ikki nøktar tørvin á náttúrufyrisiting í Føroyum. Hóast royndir hevur tað í skrivandi løtu ikki eydnast at fáa semju um nýggja náttúruverndarlóg.

Atgongdin hjá fólki til náttúruna hevur seinastu árini verið eitt sera umstrítt evni í Føroyum. Nakrir festarar og jarðeigarar hava sett skipanir í verk, har ferðafólk skulu gjalda fyri at fara út í náttúruna – á nøkrum støðum eisini føroyingar. Eisini verður ført fram, at fólk eiga at biðja um loyvi frá jarðeigara/festara fyri at fara í hagan. Grundgeving teirra er, at gongdin slítur hagan og órógvar landbúnaðarvirksemið. Hetta hevur elvt til nógv kjak. Landsstýrið lovaði í samgonguskjalinum 2019 at loysa málið, men higartil er tað ikki eydnast.

Visit Faroe Islands eftirlýsir, at okkurt hendir:

*„Vit hava onga veruliga lendislóggávu og onga náttúruverndarlóggávu, og vit hava heldur onga lóggávu, ið skipar frítíðar- og ferðavinnuvirksemið í náttúruni. Tað er tilvildin, ið ræður einsamøll á hesum økinum“.*[15]

## 5. FERÐAVINNAN Í TÓRSHAVNAR KOMMUNU KOMANDI ÁRINI

Á næstu síðunum hevur arbeiðsbólkurin gjørt uppskot um 26 átaksøki, sum skulu fremjast næstu árini. Hetta er uppskotið hjá bólkinum um ferðavinnupolitikk hjá Tórshavnar kommunu fyri 2022–2026.

Grundarlagið undir hesum ferðavinnupolitikkinum er fyrst og fremst, at í Tórshavnar kommunu skal vera gott at búgva – í dag og hjá komandi ættarliðum.

Ferðavinnan er eitt av týðandi amboðunum at skapa góð samfeløg við trivnaði, vøkstri og menning. Sum úrslit av vaksandi ferðavinnuni í Føroyum hava vit í dag ein hóp av mat- og kaffistovum í høvuðsstaðnum. Nýggjar fyritøkur síggja dagsins ljós við spennandi upplivingum. Ung flyta heim aftur á klettarnar, og vit gerast errin av okkara fjøllum, mati, móta, tónleiki, søgu og máli.

> „Havnin er kulasti býur í allari verðini“
> *– Durita Sigmundsdóttir Djurhuus, advokatur, 31 ár.*

14 ST-sáttmálin um lívmargfeldi varð samtyktur í 1992. Árið eftir setti Fólkatingið sáttmálan í gildi fyri alt ríkið, og sama ár samtykti løgtingið at taka undir við donsku staðfestingini av sáttmálanum.

15 https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9989 (Hoyringssvar frá Visit Faroe Islands til uppskot til løgtingslóg um náttúruvernd LM-096/2021)

Kjarnin í politikkinum er, at ferðandi og fastbúgvandi skulu trívast lið um lið. Hetta merkir, at tá ið átøk og verkætlanir skulu fyrireikast til ferðavinnuendamál, má altíð havast í huga, at hesi gagna nærumhvørvinum. Vit skulu raðfesta tilboð, sum *bæði* gagna fastbúgvandi og ferðafólki. Vit skulu altíð royna at finna loysnir, sum tryggja, at lokalur trivnaður og ferðavinna ganga hond í hond.

Grundleggjandi í framtíðar ferðavinnumenning hjá Tórshavnar kommunu skal vera, at hon í øllum strembar eftir at vera endurskapandi – bæði umhvørvisliga og samfelagsliga. Náttúran skal njótast og verjast – og meira enn tað. Hon skal eisini mennast soleiðis, at hon verður latin okkara eftirkomarum í betri standi enn í dag. Eisini skal ferðavinnan menna samfelagið, so vit framhaldandi hava eitt gott og gevandi samfelag at liva og virka í.

**VIT SKULU TRYGGJA**

- góða atgongd at uppliva náttúruna
- skipanir sum verja náttúruna
- átøk sum endurbøta náttúruna

Sum partur av heiminum mugu vit taka veðurlagsbroytingarnar í stórum álvara og minka útlátið av veðurlagsgassum, sum fyri okkara part annars bara er økt seinastu árini. Vit hava í seinastuni sæð dømi um, at týðandi partar av føroyska vinnulívinum vilja taka ábyrgd fyri umhvørvinum, og alsamt fleiri ferðandi hava fokus á umhvørvið, tá ið tey velja ferðamál. Land og kommunur mugu sostatt gera tað lættari hjá vinnu, borgarum og ferðandi at velja burðardygt.

Vit skulu brúka ferðavinnuna sum amboð at røkka burðardyggu málunum. Fremsta treytin er, at vit veruliga hava viljan til burðardyggu loysnirnar og síggja tær sum eina íløgu heldur enn útreiðslu.

### Málið er...

*... at í 2030 er Tórshavnar kommuna tann besta kommunan í Norðurlondum at búgva í og vitja.*

Fyri at vera ein spennandi kommuna at búgva í og vitja krevst, at vit hava góða javnvág millum júst hesi bæði. Ferðandi skulu uppliva autentisitet og vælvild, tá ið tey vitja Tórshavnar kommunu. Og borgarar skulu uppliva, at ferðafólk geva positivt íkast til lokalsamfelagið.

Eitt kveikjandi mentanarlív er ein av týdningarmiklu fortreytunum fyri at styrkja atdráttarmegina hjá kommununi. Vit skulu skapa bestu karmar um mentanarlívið, stimbra skapanargleðina og geva teimum, sum búgva her, og ferðandi enn fleiri spennandi mentanartilboð.

Ikki minst skulu vit stremba eftir at vera ein umhvørvisliga tilvitað kommuna, sum gevur fólkinum, vinnu og ferðandi møguleika at taka grønu avgerðirnar, bæði tá ið tað snýr seg um at verja globala umhvørvið og tað lokala.

Tilmælini í ferðavinnupolitikkinum leggja seg eftir at:

- tryggja góða javnvág millum búgvandi og vitjandi
- skapa umstøður til eitt kveikjandi mentanarlív
- geva øllum møguleika til at velja grønt og endurskapandi

Í hesum ferðavinnupolitikki eru uppskot um átøk, sum hava til endamáls at styrkja ferðavinnuna í Tórshavnar kommunu og samanspælið við fólk, umhvørvi og mentan. Grundgivið verður fyri hvørjum átaki, og ábyrgdin fyri at seta tað í verk verður staðsett. Eisini er kostnaðarmeting gjørd av átøkunum, har tað er gjørligt.

Avgerandi fyri at fremja politikkin er, at kommunan setur neyðuga játtan og arbeiðsorku av til átøkini.

Visit Tórshavn hevur ein týdningarmiklan leiklut at menna og marknaðarføra lokalu ferðavinnuna í kommununi og at íverkseta tilmælini í ferðavinnupolitikkinum. Umráðandi er, at Visit Tórshavn hevur neyðugu karmarnar til hesa uppgávuna.

## 6. ÁTØK

Í hesum parti eru uppskot um átøk, sum arbeiðsbólkurin metir, eiga at verða sett í verk tey komandi árini fyri at skapa bestu karmar um ferðavinnuna. Átøkini eru býtt upp í tríggjar bólkar:

Fyrsti bólkurin fevnir um átøk, sum stremba eftir at tryggja góða javnvág millum búgvandi og vitjandi.

Næsti bólkurin inniheldur átøk, sum skulu skapa umstøður til eitt kveikjandi mentanarlív.

Og triði bólkurin hevur átøk, sum skulu økja møguleikarnar at velja grønt og endurskapandi.

## 6.1 JAVNVÁG MILLUM BÚGVANDI OG VITJANDI

Virðing frá ferðafólki og vælvilji á staðnum eru avgerandi fyri eina sunna og gevandi ferðavinnu fyri báðar partar.

Fyrst og fremst er málið at innrætta ferðavinnuna soleiðis, at borgarin trívist við henni, og at fleiri hava kensluna av, at hon beinleiðis er til gagns fyri lokalsamfelagið. Vit skulu byggja ferðavinnuna, soleiðis at hon passar natúrliga inn í gerandisdag og mentan á staðnum.

Heldur enn at satsa upp á hópferðavinnu, skal kommunan leggja dent á ferðafólk, sum kasta nógv av sær fíggjarliga, vitanarliga og mentanarliga, og sum geva virksemi alt árið. Hetta skapar støðug arbeiðspláss í ferðavinnuni og tryggjar, at eitt nú matstovur kunnu hava opið alt árið – til gleði fyri nógv.

Við neyvari hagtølum og vitan um ferðafólkini skulu vit skapa betri karmar um ferðavinnuna og stýra henni tann vegin, hon tænir samfelagnum best.

### 6.1.1 STYRKJA VINNUFERÐAVINNUNA

Tórshavnar kommuna skal satsa enn meira upp á vinnuferðavinnu, ið er sonevndi MICE-málbólkurin (Meetings, Incentives, Conferences og Events). Hetta eru t.d. ráðstevnur, altjóða fundir, ítróttarkappingar, mentanartiltøk og serligar ferðir sum toymismenning og bonusferðir, ið útlendskar fyritøkur geva sínum starvsfólkum.

Málið er, at Tórshavnar kommuna verður ein av bestu vinnuferðavinnubýum í Evropa.

Fremstu fyrimunir við vinnuferðandi eru, at tey vitja uttan fyri vanliga háárstíð og eru tann bólkurin, sum leggur mest pening eftir seg. Í Føroyum kenna vit ikki nýtsluna hjá vinnuferðandi sammett við aðrar ferðafólkabólkar, men tøl hjá VisitDenmark[16] vísa, at útlendsk handilsferðandi á gistingarhúsum í Danmark brúka 3.300 kr. um samdøgrið. Til sammetingar brúktu útlendsk frítíðarferðandi 2.500 kr. um samdøgrið.[17]

Vinnuferðandi eru ofta tilvitað um burðardygd, lokalt handverk og góðan mat, umframt at nógv av tiltøkunum geva borgarunum íblástur og vitan, t.d. vísundaligar ráðstevnur.

---

16 Turismens økonomiske betydning i Danmark 2019. Nýggjasta kanning av samdøgursnýtsluni hjá ferðandi í Danmark er frá 2017.

17 Nýtslan fevnir um gisting, innlendis flutning, mat- og kaffistovur, handlar, søvn o.a. Útreiðslur til ferðing til Danmarkar eru ikki íroknaðar samdøgursnýtsluna.

Tórshavnar kommuna er væl fyri við gistimøguleikum, matstovum, fundarumstøðum og ítróttarhentleikum. Stórhøllin, sum er í umbúnað, fer at gera umstøðurnar enn betri.

NM í fótbólti fyri U21-landslið 2018
8 lond – 212 luttakarar
Samlað nýtsla 5,85 mió. kr.
Kelda: Vinnuferðavinna, Løgmansskrivstovan

Í 2019 vóru 25 tiltøk innan fyri vinnuferðavinnu í Havn. Tá eru virkisferðir ikki íroknaðar. Í 2020 skuldu 25 slík tiltøk vera í Føroyum, men orsakað av koronu vórðu bara trý avgreidd. Hini vórðu útsett, talgild ella avlýst.

At fáa fatur á MICE-málbólkinum krevur nógv uppleitandi arbeiði og tekur tíð. Tórshavnar kommuna, Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn og ferðavinnuaktørar hava í nøkur ár samstarvað um eina vinnuferðavinnudeild, har tvey fólk starvast. Samstarvið hevur roynst væl, og stórur áhugi er fyri at koma til føroyska høvuðsstaðin at hava fundir, ráðstevnur, ítróttartiltøk o.a.

Har eru tó ótroyttir møguleikar innan fyri økið, og tí eigur størri orka at verða sett til at fáa fatur á hesum partinum av ferðandi. Tórshavnar kommuna stuðlar í dag vinnuferðavinnutiltøkum við m.a. móttøku og fíggjarligum stuðuli til sjálvt tiltakið. Umhugsað eigur at verða, um land og kommuna skulu hava eina meira samlaða og gjøgnumskygda stuðulsskipan við hægri játtan, sum fyriskiparar kunnu søkja úr.

At styrkja hetta økið skal síggjast sum ein íløga, sum verður gjørd í ferðavinnuna nú og sum lønar seg væl og virðiliga aftur.

*ÁTAK: Samstarvið um vinnuferðavinnu eigur at verða styrkt við øktari játtan, soleiðis at vit kunnu fáa fleiri ráðstevnur og tiltøk hendanvegin. Land og kommuna eiga at hava eina meira samlaða og gjøgnumskygda stuðulsskipan til vinnuferðavinnu.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna, Visit Tórshavn, Visit Faroe Islands, landið og ferðavinnuaktørar.*

### 6.1.2 STYRKJA VISIT TÓRSHAVN
Ferðavinna røkkur út í hvønn krók í landinum. Hon hevur ávirkan á so gott sum allar vinnugeirar og øll samfelagsviðurskifti – búskap, samleika og trivnað.

Tórshavnar kommuna hevur í nógv ár verið virkin viðleikari, tá ið tað kemur til at menna ferðavinnuna. Visit Tórshavn hevur uppgávuna at arbeiða ítøkiliga við ferðavinnu, marknaðarføring og menning og hevur eina játtan á fíggjarætlanini til tess.

Á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu eru settar 3,46 mió. kr. av til Visit Tórshavn. Skal ferðavinnupolitikkurin fremjast í verki, er neyðugt, at Visit Tórshavn fær hægri játtan at arbeiða við.

Ferðavinnan kennir ikki kommunumørk, og tí hava Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn í fleiri ár samstarvað tætt við landsmyndugleikar um ferðavinnuna. Heilt ítøkiligt samstarv er við Visit Faroe Islands um vinnuferðavinnu. Samstarvið er fruktagott og eigur at verða ment frameftir.

Seinastu árini hevur Visit Faroe Islands marknaðarført Føroyar sum UNspoiled, UNexplored og UNbelievable við góðum úrslitum. Fokus hevur verið á náttúru og náttúruuplivingar.

Tórshavnar kommuna vil vera besta vinnuferðamál og eisini draga til sín yngri ferðafólk, sum síggja virðið í mótsetningunum millum tað nýggja og tað gamla. Tað nýhugsandi og tað siðbundna. Náttúruna og stórbýarlívið.

Vit eiga komandi árini at leggja dent á at lýsa Tórshavnar kommunu sum eitt sera fjølbroytt ferðamál við *bæði* náttúru *og* øllum teimum spennandi upplivingum, sum ein nýmótans høvuðsstaður kann bjóða.

*ÁTAK: Visit Tórshavn eigur at fáa hægri játtan til at fremja ferðavinnupolitikkin í verki og at marknaðarføra Tórshavn sum ferðavinnu- og vinnuferðavinnubý.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn.*

### 6.1.3 FERÐAVINNUÚTBÚGVINGAR Í HAVN

Tørvur er á útbúnum starvsfólki á fleiri økjum í ferðavinnuni.

Í dag ber til at taka útbúgving í marknaðarførslubúskapi og tænastubúskapi í Føroyum. Ferðavinnan eftirlýsir fleiri útbúgvingar, t.d. sum móttøkufólk, skrivstovuútbúgving við ferðavinnu sum sergrein, event management og hospitality management, ið fevna um leiðslu og rakstur, tá ið umræður upplivingar, gistingarhús og ferðavinnu. Tørvur er eisini á at kanna, hvussu kokka- og tænaraútbúgvingarnar skulu skipast frameftir.

Við at skipa ferðavinnuútbúgvingar í samstarvi við t.d. Glasir verður høgligari at útbúgva seg. Vit fáa útbúgvingar við støði í føroyskum viðurskiftum, og ferðavinnan gerst sjónligari sum yrkismøguleiki hjá føroyskum ungdómi. Tað gevur professjonellari umhvørvi og fær starvsfólk at støðast betur. Eisini gevur hetta skattainntøkur og skapar trivnað í býnum.

Vit eiga eisini at stimbra og stuðla upp undir styttri skeið í føroyskari matmentan og føroyskum rávørum, so sum fiski, seyði og grønmeti. Hetta økir vitanina um okkara egna tilfeingi og kann eggja fleiri ungum til at velja sær útbúgving í matstovuyrkinum.

At skipa útbúgvingar er ein landsuppgáva, men kommunan eigur at streingja á landsmyndugleikarnar at fáa útbúgvingarnar í lag. Ein leiklutur hjá kommununi er eisini at fyrireika lestrarbústaðir.

*ÁTAK: Stovnast skulu fleiri útbúgvingar í ferðavinnu í Føroyum og ein ætlan gerast fyri, nær hesar kunnu bjóðast út.*
*Ábyrgd: Landið, Ferðavinnufelagið, útbúgvingarstovnar og Tórshavnar kommuna*

### 6.1.4 NEYVARI FERÐAVINNUHAGTØL

Fyri at tryggja, at ferðavinnan kastar sum mest av sær til samfelagið, er neyðugt við hollari vitan um hana. Í Føroyum vanta grundleggjandi ferðavinnuhagtøl, sum kunnu brúkast sum stýringsamboð fyri ferðavinnuna og lýsa leiklutin hjá ferðavinnuni í føroyska búskapinum.

Hagstova Føroya og Visit Faroe Islands eru tí farin undir eina verkætlan at menna ferðavinnuhagtøl eftir altjóða leisti, sum verður nevndur Tourism Satellite Account (stytt TSA). TSA er ein serligur fylgiroknskapur fyri ferðavinnu, sum er knýttur at tjóðarroknskapinum. TSA skal tryggja, at øll lond fylgja somu meginreglum, tá ið tey gera ferðavinnuhagtøl og meta um búskaparliga týdningin av ferðavinnuni.

TSA ger tað møguligt hjá landi, kommunum og vinnu at brúka ferðavinnuhagtølini til at velja meiri tilvitað, tá ið tað snýr seg um ferðavinnuna. TSA gevur harumframt grundarlag fyri at menna økisbýtt ferðavinnuhagtøl, sum verða nevnd Regional Tourism Satellite Account (RTSA). RTSA kann lýsa búskaparliga týdningin av ferðavinnuni í ávísum øki, t.d. nýtslu hjá ferðafólkum, ið vitja í Havn, ella starvsfólkatal í ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu. TSA er grundarlagið undir RTSA.
Tað er umráðandi at fáa TSA-verkætlanina í trygga legu, so hon ikki dettur niðurfyri vegna vantandi játtan. Eisini er av stórum týdningi at fáa økisbýttu ferðavinnuhagtølini, RTSA.

*ÁTAK: Landið má raðfesta TSA-verkætlanina við at veita neyðugu játtanina.*
*Er tørvur á fígging frá Tórshavnar kommunu til RTSA, eigur hon at vísa hesum vælvild.*
*Ábyrgd: Landið, Visit Faroe Islands og partvíst Tórshavnar kommuna,*

### 6.1.5 STYRKJA SAMSKIFTIÐ VIÐ FERÐAVINNUNA

Tórshavnar kommuna skal skipa góðar karmar um ferðavinnuna, so at flest møgulig fáa ágóðan av henni. Ferðavinnan skapar arbeiðspláss, gevur skatta-inntøkur, ger kommununa meira lokkandi at búgva í og mennir fjølbroytt úrval av frítíðartilboðum.

Ferðavinnan hevur brúk fyri góðum og smidligum samstarvi við kommununa, m.a. í sambandi við byggiloyvi, nýtsluloyvi, burturkast, parkering o.s.fr. Er samskiftið trekt, og mannagongdirnar stirvnar, kann hetta darva ferðavinnuna og neyðugu nýmenningina á økinum. Kommunan skal halda lóggávu og mannagongdir, sum eru innbygdar í almenna fyrisiting. Málini eru ofta samansett og fevna um fleiri deildir og starvsfólk, sum skulu viðgera og taka avgerðir.

Kommunan eigur at styrkja samskiftið við ferðavinnuna. Hetta kann til dømis gerast við einum forum, har ferðavinnuaktørar, leiðarar fyri viðkomandi deildir í kommununi og politikarar regluliga hittast til at umrøða viðurskifti av týdningi fyri ferðavinnu og kommunu.

Eisini eigur kommunan at gera ein leist fyri smidligari mannagongdir í máls-viðgerð, uttan at hetta gongur út yvir dygdina í málsviðgerðini. Ein møguleiki er, at vinnulívsaktørar hava ein fastan málsviðgera í kommununi, hóast málið verður viðgjørt av fleiri deildum og starvsfólkum.

Avtala eigur eisini at verða gjørd við aðrar myndugleikar (t.d. landsmyndugleikar) um viðgerðartilgongdina í vinnulívsmálum, m.a. við tí fyri eyga at gera viðgerðar-tíðina smidligari og meira samanhangandi.

*ÁTAK: Tórshavnar kommuna styrkir samskiftið við ferðavinnuna og ger smidligari manna-gongdir fyri málsviðgerð.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna.*

> „Heimablídni er eitt sera gott modell. Eg og omma hava onkuntíð heimablídni“
> *– Árni Winther Jákupsson, ferðaleiðari og sølumaður, 21 ár.*

### 6.1.6 HJÚKLA UM SMÁAR AKTØRAR

Styrkin í ferðavinnuni er, at pláss er fyri bæði stórum og smáum aktørum. Nógvar fyritøkur í ferðavinnuni eru einstaklingafyritøkur, t.d. heimablídni, handverk um-framt ferðaleiðarar. Hesir vinnumøguleikar eru við til at skapa trivnað og inntøkur á smáplássum. Vit mugu ikki missa tað lokala og autentiska og eiga at styrkja tey smærru vinnurekandi.

Tað hevur týdning, at kommunan heldur fram við at skapa karmar fyri at menna ferðavinnutilboð.

Hugskotið veitir ráðgeving og møguleika fyri innivist í einum íverksetanarumhvørvi. Tað er avgerandi, at kommunan heldur fram við at stimbra nýskapandi íverksetaraumhvørvið.

Smáu íverksetararnir kunnu kenna seg einsamallar í sínum virksemi og hava tørv á samstarvi og sparring við onnur. Tí hevði verið gott við einum netverki til smærru ferðavinnuaktørarnar, har teir m.a. kunnu fáa ráðgeving til at gerast sjónligari, soleiðis at teir lættari kunnu selja sínar vørur og upplivingar.

*ÁTAK: Visit Tórshavn eigur í samstarvi við Hugskotið at stovna eitt netverk fyri smærri ferðavinnuaktørar og skipa fyri kveikjandi og førleikamennandi tiltøkum fyri teir.*
*Ábyrgd: Visit Tórshavn, Hugskotið, Visit Faroe Islands og hinar kunningarstovurnar.*

### 6.1.7 BETRI FERÐASAMBAND TIL OYGGJARNAR

Ferðavinnuvirksemið í Nólsoy, Hesti og Koltri er púra treytað av góðum sjóvegis ferðasambandi, og tí eiga vit at tryggja betri og regluligari ferðasamband millum oyggjarnar í Tórshavnar kommunu og meginøkið.

Í øllum trimum oyggjunum er ferðasambandið ónøktandi. Koltur hevur tyrlusamband, men onki skipað sjóvegis samband. Hestur hevur regluligt ferðasamband við Teistanum, men fáu, dagligu túrarnir gera tað trupult at reka ferðavinnu í oynni. Nólsoy hevur fleiri dagligar túrar, men rutusambandið er ótrygt, tí Ternan javnan verður tikin burturfrá til aðrar farleiðir.

Nólsoy hevur bygt upp nógv ferðavinnutilboð seinastu árini. Eisini í Hesti er ferðavinnuvirksemi, og í Koltri eru spennandi ætlanir um granskingar-, undirvísingar- og ferðavinnuvirksemi.

Skulu Nólsoy, Hestur og Koltur mennast í ferðavinnuhøpi er neyðugt við fleiri túrum og tryggleika á rutunetinum. Ferðavinna á útoyggj er vinna, sum sjálvsagt má javnsetast við aðra vinnu.

Tryggari rutunet gevur oyggjunum betri vinnumøguleikar sum heild, og hetta skapar grundarlag fyri fólkavøkstri.

*ÁTAK: Landið eigur at tryggja tíðarhóskandi ferðasamband til Nólsoyar, Hest og Koltur.*
*Ábyrgd: Landið.*

### 6.1.8 VESI, SKJÓL OG SKELTI

Grundleggjandi hentleikar so sum almenn vesi mugu vera í øllum bygdum í kommununi. Tað ber ikki til at dúva uppá, at privatfólk leggja hús og vesi til ferðandi.

Umframt bygdirnar eiga støð í Tórshavn, sum eru serliga nógv vitjað, at hava almenn vesi. Til dømis við Svartafoss og økið við Sandá í Havnardali, har varðagøtan til Kirkjubø byrjar. Almennu vesini mugu vera sjónlig og samstundis fella væl inn í umhvørvið.

Vitjandi á oyggjunum í kommununi mugu fáa skjól fyri veðri og vindi. Ofta er langt ímillum ferjutúrarnar, og ferðandi kunnu gerast illa stødd í illveðri. Kommunan eigur saman við staðbundnu nevndunum og SSL at finna hóskandi loysn.

Visit Tórshavn hevur gjørt eina skeltingarætlan, sum fevnir um lendisgøtur, bygda- og gongutúraskelti og vitjanarverd støð í Havn. Hendan skeltingarætlan eigur at halda fram. Harumframt er tørvur á skeltum við vegleiðingum um at virða privatlívið hjá fólki í býlingum og bygdum, har nógv ferðafólk vitja. Hetta kunnu vera skelti áheitan um ikki at fara ov nær húsum og vindeygum hjá privatfólki og lata vera við at taka myndir.

*ÁTAK: Bygdirnar og tey mest vitjaðu støðini í Havn mugu hava almenn vesi. Skjól skulu útvegast til ferðafólk á oyggjunum, og Visit Tórshavn heldur á at skelta, har tørvur er á tí. Ábyrgd: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn.*

### 6.1.9 FERÐAVINNA FYRI ALLA KOMMUNUNA

Styrkin við ferðavinnuni í Tórshavnar kommunu er, at her eru so nógvar og fjølbroyttar upplivingar. Alt frá matstovum og gistingarhúsum á høgum stigi í Havn til sterkar náttúruupplivingar og hugnaligt heimablídni á bygd.

Tað hevur týdning, at ferðavinnan í Tórshavnar kommunu er fyri øll, og at hon sprettur úr lokala umhvørvinum. Ferðavinnuætlanir eru gjørdar fyri Kirkjubø og Nólsoy. Ynskiligt er, at aðrar bygdir í kommununi verða raðfestar komandi árini, sjálvsagt treytað av, at ynski er um hetta lokalt.

Við eini ferðavinnuætlan ber til at skipa ferðavinnuna í økinum, so hon verður til størst gagn fyri íbúgvarnar og kann lofta møguligum óhepnum avleiðingum av ferðavinnuni. Lokalar ferðavinnuætlanir mugu gerast í tøttum samstarvi við íbúgvar og staðbundnar nevndir. Tað hevur týdning, at kommunan áhaldandi hevur avtalu við lokalu kunningarstovuna í Nólsoy, og at Visit Tórshavn kunnar um ferðavinnutilboð í allari kommununi.

*ÁTAK: Allar bygdir í kommununi skulu kunna hava góðar møguleikar at menna ferðavinnu. Ætlanir og átøk skulu taka støði í einstøku bygdunum og gerast í tøttum samstarvi við íbúgvar á staðnum.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn.*

### 6.1.10 BÝARLÍV

Kommunan má virka fyri, at Tórshavn er ein býur fullur av lívi og menniskjum.

Hús við fastbúgvandi fólki og ljósi í vindeygunum – serliga í vetrarhálvuni skapa trivnað og størri sosialt virksemi í grannaløgum. Tørvurin á bústøðum í Havn er stórur bæði at leiga og keypa.

Tí skal kommunan seta í verk tiltøk, sum stuðla upp undir, at fólk í øllum aldri búseta seg í miðbýnum, soleiðis at íbúgvar eru partur av gøtumyndini.

Borgarar og handilsvinna eftirlýsa eisini ein hugnaligari og meira livandi miðbý við m.a. matmarknaði, gøtumati (streetfood), útiservering, savnandi býarrúmum, spæliplássi og útvendum virksemi í niðastu hædd í bygningunum. Fleiri borgarar ynskja sær ein miðbý, sum gevur meira rúmd til fólk.

Eisini eru ynski um meira livandi umhvørvi við sjóvarmálan, har fólk, frítíðarfelagsskapir og ferðavinnuaktørar kunnu møtast. Til dømis virksemi sum havsvimjing, kaving, frítíðarsigling umframt kappróður, sum er natúrligur partur av býarmyndini í Havn.
At miðbýurin og sjóvarmálin gerst savningarstað hjá ymsu pørtunum í frítíðarlívinum skapar trivnað millum fólk, umframt at tað dregur útlendsk ferðafólk at sær, serliga barnafamiljur.

*ÁTAK: Tórshavnar kommuna eigur áhaldandi at arbeiða fyri einum livandi miðbýi og eisini virka fyri trivnaði í økjum við sjóvarmálan. Kommunan eigur at seta í verk tiltøk, sum stuðla uppundir, at fólk í øllum aldri búseta seg í miðbýnum.*
*Ábyrgd: Landið, Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn.*

### 6.1.11 CRUISEVINNAN SKIPAST

Cruisevinnan má skipast betur, soleiðis at hon tekur fyrilit fyri náttúruni, sosiala umhvørvinum og kastar meira av sær fíggjarliga.

Nógvastaðni í londunum rundan um okkum eru atfinningar móti cruiseskipum. Eisini í Havn. Sagt verður m.a., at cruiseferðafólk fylla ov nógv upp í býarmyndini, leggja ov lítið av pengum eftir seg sammett við aðrar bólkar av ferðafólkum, og at skipini eru dálkandi fyri umhvørvið.

Áhugin at koma til Føroya við cruiseskipi er vaksin spakuliga frá aldarskiftinum og fram til 2015, tá ið 71 skip vitjaðu. Fram til 2020, tá ið korona fór at herja, vóru í miðal 47 cruiseskip í Føroyum. Nógv tey flestu vitjaðu í Havn.

> *Í 2019 vitjaðu 51 cruiseskip í Føroyum við yvir 35.000 ferðafólkum. Øll uttan trý vitjaðu í Havn. Í 2020 var bert eitt skip og í 2021 trý cruiseskip í Føroyum. Kelda: TAKS.*

Noreg hevur ásett reglur um null-útlát innan 2026 á ávísum firðum, og har fara tey nú at endurskoða karmarnar fyri virksemið hjá cruisevinnuni. Ein cruisestrategi varð orðað fyri Tórshavnar kommunu í 2019, men varð ikki endaliga samtykt.

*ÁTAK: Arbeiðið við cruisestrategiini hjá Tórshavnar kommunu skal takast upp aftur, soleiðis at kommunan hevur eina ætlan fyri hesa vinnu. Í hesum sambandi skulu serlig fyrilit takast fyri nógv vitjaðum støðum so sum Reyn og Kirkjubø.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna.*

### 6.1.12 ATKOMA FYRI ØLL

Ferðandi við skerdum førleikum, t.d. rørslutarnað, eiga ikki at vera fyri vanbýti, tá ið tey vitja í høvuðsstaðnum. Tórshavnar kommuna má stremba eftir at tryggja øllum atkomu uttan mun til førleikar.

Havast skal í huga, at ein vaksandi partur av íbúgvunum í Føroyum eru eldri fólk. Vit skulu geva teimum, sum búgva her og ferðafólki so góðar umstøður sum gjørligt at flyta seg runt í kommununi og fáa ágóðan av tilboðum og upplivingum, ið eru at finna her.

Ábøtur eru hendar nógvastaðni í kommununi, men framvegis er tað trupult hjá til dømis fólki í koyristóli at sleppa inn á summar matstovur, kaffistovur og handlar í Havn.

Kommunan eigur í størri mun at fylgja við, um krøv til atkomu sambært kunngerð verða fylgd. Mælt verður til, at ferðavinnuaktørar hava fólk við skerdum førleika í huga, tá ið ferðavinnutilboð verða ment.

MEGD hevur gjørt ein lykil, sum vísir gestum atkomuligar matstovur, og Visit Tórshavn og MEGD hava gjørt eitt yvirlit yvir atkomuligar matstovur og gistingarhús. Hetta samstarvið eigur at halda fram, og listin eigur at vera talgildur og støðugt dagførdur.

Tá ið gøtur verða gjørdar ella umvældar, eigur at verða hugsað um undirlendið, soleiðis at fólk við rørslutarni hava møguleika at ferðast í náttúruvøkrum økjum.

*ÁTAK: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn eiga í samráð við MEGD at menna ferðamøguleikar hjá fólki, sum hava skerdar førleikar. Eisini eigur yvirlitið yvir atkomuligar matstovur og gistingarhús at verða dagført.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna, Visit Tórshavn, ferðavinnuaktørar og MEGD.*

## 6.2 KVEIKJANDI MENTAN

Mentanarferðavinna er ein týðandi og vaksandi partur av ferðavinnuni kring allan heimin. Seinastu gott 10 árini hevur vøksturin í mentanarferðavinnuni verið størri enn í ferðavinnuni sum heild.[18] Hjá nógvum ferðandi eru júst mentanartilboðini ein orsøk til, at tey velja eitt ávíst stað sum ferðamál. Tað kann vera søga, arkitekturur, myndlist, tónleikur, søvn, móti, matmentan, ítróttur ella annað, sum dregur.

Fleiri býir hava søguliga drigið nógv fólk at sær, t.d. París, Rom og Athen, men í nýggjari tíð hava fleiri fingið eyguni upp fyri møguleikunum í mentanarferðavinnu. Til dømis hevur Århus gjørt nógv burturúr at marknaðarføra síni mentanartilboð, og býurin var útnevndur evropeiskur mentanarbýur í 2017. Eisini Reykjavík, sum var mentanarbýur í 2000, hevur satsað upp á mentanarferðavinnu umframt náttúruferðavinnuna.

Størsta týdningin hevur mentanin kortini fyri íbúgvarnar, tí list og mentan eru týðandi grundarlag undir samfelagsmenning, trivnaði og dannilsi. Føroyar hava nógv dugnalig listafólk, ríka søgu og forvitnisligar, gamlar gripir. Vit hava hópin av mentanarligum tilfeingi at ríka bæði borgarar og ferðandi við. Tað snýr seg um at síggja virðið í mentanini og geva henni virðilig kor.

Sum natúrligt er liggja fleiri av stóru mentanarstovnum í høvuðsstaðnum, t.d. Listasavn Føroya, Tjóðsavnið og Norðurlandahúsið. Hetta er ein framíhjárættur, sum eisini ber í sær skyldur. Kommunan eigur at hjúkla um stovnarnar og saman við landinum virka fyri, at teir sleppa at blóma, bæði borgarum og ferðandi at gagni.

Mentanarferðavinna breiðkar áskoðarahópin til okkara mentanartilboð og gevur mentanarstovnum og listafólki inntøkur. Og hetta betrar grundarlagið fyri enn fleiri og betri mentanartilboðum.

18 Kulturdepartementet og Nærings- og fiskeridepartementet (2019) Strategi for kultur og reiseliv – Noreg som attraktiv kulturdestinasjon

### 6.2.1 ORÐA MENTANARPOLITIKK

Tórshavnar kommuna er karmur um ríkt mentanarlív og hevur gjøgnum ár og dag veitt mentanini fitt av stuðli bæði til rakstur, íverksetan og hølisviðurskifti. Eitt álit var gjørt um mentan og list í Tórshavnar kommunu í 2000. Tørvur er á at endurskoða kommunal mentanartilboð, stuðulsskipanir og at seta út í kortið av nýggjum, hvat kommunan ætlar á mentanarmótinum.

Tórshavnar kommuna eigur at hava ein mentanarpolitikk við visjónum og málum fyri næstu 10–12 árini, sum røkka tvørtur um fíggjarætlanir og kommunuval.

Ein tíðarhóskandi og dagførdur mentanarpolitikkur skal veita okkara skapandi fólki, søvnum og livandi mentan so góðar karmar sum gjørligt. Politikkurin skapar dynamikk og gevur borgarum og ferðafólki kveikjandi upplivingar. Hjá nógvum ferðandi hava mentanartilboðini stóran týdning, tá ið tey velja sær ferðamál.

Vit mugu gjarna hugsa stórt. Seta okkum spennandi mál og samstundis byggja á okkara serligu mentan og autentisitet. Íløgur í mentanina eru íløgur í okkara borgarar og gera okkum samstundis til eitt blómandi ferðamál.

Tað er umráðandi, at mentanarpolitikkurin fevnir breitt um nógv mentanarøki, og at hann leggur dent á tónleikalív, leiklist, samtíðarmentan, eksperimentarandi list og skapanarhugin hjá unga ættarliðnum.

Í mentanarpolitikkinum eiga at gerast greiðar leiðreglur fyri, hvussu stuðul til mentan og ítrótt eigur at verða tillutaður.

*ÁTAK: Tórshavnar kommuna orðar ein mentanarpolitikk, har sett verður út í kortið visjónir og mál fyri mentanarøkið næstu 10-12 árini.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna.*

### 6.2.2 EVROPEISKUR MENTANARHØVUÐSSTAÐUR

Tórshavn er millum minstu høvuðsstaðir í heiminum, men eigur ikki at smæðast burtur, tá ið tað kemur til mentan. Við okkara góða tilfeingi av skapandi fólki kunnu vit við visjonerum mentanarpolitikki røkka nógv størri málum, enn vit beint nú tora at droyma um.

Vakstrarforum undir Løgmansskrivstovuni hevur mælt til, at Havnin verður mentanarhøvuðsstaður í 2030, og at kommuna og land í felag orða boðið upp á at gerast mentanarhøvuðsstaður.

At smáir býir og samfeløg hava áræði bjóða seg fram at vera mentanarhøvuðsstaður er ikki ókent um okkara leiðir. Bodø í Noregi verður við sínum uml. 50.000

íbúgvum evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 2024. Hóast tað kann tykjast dýrt at fara undir slíka verkætlan, gevur hon listaumhvørvinum og samfelagnum sum heild nógv aftur.

Tá ið Bodø verður mentanarhøvuðsstaður í 2024, er ætlanin, at umleið 60% av mentanartiltøkunum vera í sjálvum Bodø, meðan hini 40% vera aðrastaðni í Nordland-økinum, sum Bodø er partur av. Samferðsluliga eru Føroyar so væl samanknýttar, at alt landið kann gerast partur av eini slíkari verkætlan.

Ein vanlig fortreyt fyri at gerast mentanarhøvuðsstaður er, at landið er limur í ES ella EBS-samstarvinum. Tað eru Føroyar ikki. Ein annar møguleiki er gjøgnum Creative Europe, sum er evropeiskt samstarv. Arbeitt verður í løtuni við at útvega Føroyum atlimaskap í Creative Europe.

*ÁTAK: Tórshavnar kommuna eigur at stuðla ætlanini hjá Vakstrarforum um, at Havnin gerst evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 2030.*
*Ábyrgd: Landið og Tórshavnar kommuna.*

### 6.2.3 SPENNANDI SØVN

Kommunan má stuðla upp undir, at høvuðsstaðurin altíð hevur fjølbroytt og tíðarhóskandi savnstilboð til borgarar og ferðandi. Søvnini hava stóran týdning fyri okkara samleika, søguligu fatan og almenna dannilsi. Nógv ferðandi hava stóran áhuga fyri at síggja og uppliva okkara søgu og mentan, og eisini millum føroyingar er vaksandi áhugi fyri savnstilboðum.

Grannalondini raðfesta at hava áhugaverd søvn til ferðafólk, og umráðandi er, at okkara søvn eru á høgum stigi, tí ferðafólk í dag seta stór krøv til dygdina. Eisini skal hugsast um samvirkna (interaktiva) partin, serliga í tilboðum sum venda sær til yngra ættarliðið. Søvnini skulu taka støði í bæði fortíð, nútíð og peika frameftir.

Fleiri søvn eru í kommununi. Summi eru landsstovnar, nøkur eru sjálvsognarstovnar og uppaftur onnur eru kommunal. Kommunan veitir í dag stuðul til nøkur av søvnunum, og hesin stuðulin verður veittur á ymiskum grundarlagi.

Hóast kommunan ikki eigur fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av søvnum undir landinum, eigur hon at virka fyri, at tey fáa bestu karmar og nøktandi staðseting.

Tjóðsavnið heldur til í einum ídnaðarøki í Hoyvík. Áhugin fyri savninum er øktur, men mett verður, at vitjanartalið kundi verið munandi størri, var savnið nærri býnum. Ynskiligt er, at kommunan hjálpir til við at finna øki nærri býnum til Tjóðsavnið.

| | |
|---|---|
| 2014 | 6.214 |
| 2018 | 11.649 |
| 2019 | 16.036 |
| 2020 | 7.806 |
| 2021 | 10.529 |

Vitjandi á framsýningunum hjá Tjóðsavninum í Brekkutúni í Hoyvík. Størri parturin av teimum vitjandi eru útlendingar uttan í 2020 og 2021, tá ið korona gjørdi um seg. Kelda: Tjóðsavnið.

Kommunan hevur eitt býarsavn, sum eigur nógvar forvitnisligar lutir úr søguni hjá høvuðsstaðnum. Eisini eru bygdasøvn í Kollafirði og Nólsoy. Kommunan eigur at skapa góðar karmar fyri hesi søvn.

Ætlanir eru at byggja nýtt sjósavn á Argjum, sum eisini verður granskingarstovnur og náttúruskúli. Savnið kann gerast týðandi savningar- og vitanardepil fyri fólk í øllum aldri. Kommunan eigur at vísa verkætlanini vælvild.

*ÁTAK: Kommunan eigur at raðfesta søvnini í høvuðsstaðnum, soleiðis at tey kunnu geva borgarum og ferðafólki góðar og kveikjandi upplivingar.*
*Ábyrgd: Tórhavnar kommuna og landið.*

### 6.2.4 VARÐVEITA OG VERJA FORNMINNI

Fleiri áhugaverd fornminni eru í kommununi, sum mugu verjast og gerast atkomiligari.

Kirkjubøur er ein av mest vitjaðu bygdunum í landinum. Áhugin fyri fornminnunum er stórur, og mongu vitjanirnar gera, at økið rundan um Múrin og við Stokkastovuna er merkt av sliti.

Tjóðsavnið, sum hevur ábyrgdina av fornminnunum í Kirkjubø, hevur í eina tíð arbeitt við einari loysn at verja undirlendið. Tó er ongin endalig avgerð tikin. Kommunan eigur saman við Tjóðsavninum at finna eina loysn á trupulleikanum. Eisini má landið røkja sínar skyldur at verja og varðveita fornminnini í Kirkjubø, so tey ikki forfarast av sliti, illveðri og tíðarinnar tonn.

Eitt annað vælumtókt ferðamál er Havnar Skansi. Tjóðsavnið og Tórshavnar kommuna hava samskift um at skapa eitt meira livandi umhvørvi á Skansanum, eitt nú við matstovu og framsýning. Skansin hevur eina spennandi søgu í einum vøkrum umhvørvi, sum fólk eiga at sleppa at uppliva.

Kommunan eigur saman við landinum at finna loysnir, sum tryggja góða atgongd og sum samstundis verja søguligu virðini.

*ÁTAK: Landið má tryggja, at fornminnini í Kirkjubø og á Skansanum verða varðveitt. Kommunan og landið mugu saman við Tjóðsavninum tryggja, at undirlendið við fornminnini í Kirkjubø verður vart, og tryggja eitt livandi umhvørvi á Skansanum. Loysnirnar mugu hava fyrilit fyri virkseminum á staðnum og virðing fyri fornminnunum.*
*Ábyrgd: Landið, Tjóðsavnið og Tórshavnar kommuna.*

### 6.2.5 STUÐLA KOLTURSÆTLANINI

Koltur er ein gimsteinur í Tórshavnar kommunu bæði við náttúru og mentan. Fyri nøkrum árum síðan fekk Tjóðsavnið ábyrgdina av oynni. Spennandi ætlanir eru um at menna savn, náttúrugranskingarpark og vitjanardepil í Koltri.

Uppskotið fevnir um ein mentanarsøguligan part og ein náttúrufrøðiligan part. Í sunnara parti av oynni verður bygdarlag og bøur, og norðari parturin verður náttúrugranskingarstøð. Ætlanin er at geva ferðafólki, skúlanæmingum, granskarum o.ø. møguleika at vitja Koltur.

Koltursætlanin gevur fólki atgongd til eina náttúruperlu, og ferðavinnan verður á hendan hátt breidd út til fleiri øki í Føroyum.

> *Koltursætlanin er mett at kosta umleið 65 mió. kr. Útlendskir grunnar bjóða sær til at fíggja meginpartin, men seta sum treyt, at føroyskir myndugleikar eisini geva eitt íkast.*

Løgtingið hevur samtykt at geva landsstýrismanninum í mentamálum heimild at fíggja tilsamans níggju milliónir krónur til Koltursætlanina – tríggjar milliónir árliga í 2023–2025.

Eisini kommunan eigur at stuðla Koltursætlanini. Fyri at taka ímóti nógvum vitjandi mugu vatn- og kloakkviðurskiftini í Koltri dagførast, og lendingarviðurskiftini betrast, m.a. soleiðis at fólk við rørslutarni kunnu vitja oynna. Her kann Tórshavnar kommuna geva sítt íkast til ætlanina.

*ÁTAK: Kommunan stuðlar upp undir Koltursætlanina við eitt nú at dagføra vatn-, kloakk- og lendingarviðurskiftini í oynni.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna saman við landinum.*

## 6.3 GRØNT FERÐAMÁL

Hjá nógvum føroyingum er ríka náttúran ein av týðandi orsøkunum til, at okkum dámar at búgva her langt úti í Norðuratlantshavinum. Stórsligna náttúran er eisini tað, sum kveikir áhugan hjá nógvum útlendskum ferðafólkum at leita sær hendanvegin at vitja.

Vit hava eina stóra uppgávu at varðveita, verja og menna okkara náttúru, soleiðis at komandi ættarlið eisini kunnu njóta hana. Okkara virksemi leggur trýst á náttúruna, m.a. bygging, drening av vátlendum, burturkast og intensivt seyðahald. Eisini ferðavinnan leggur trýst á náttúruna, m.a. við at lendið í summum økjum verður slitið.

Fyri at verja og endurbøta náttúruna mugu bæði land, kommunur, vinnulív, borgarar og vitjandi gera sítt.

Uppgávan hjá landinum er at gera lógarkarmarnar. At gera tíðarhóskandi lóggávu, sum verjir náttúruna og at skipa eina holla náttúrufyrisiting við neyðugum fakligum innliti. Eisini má landið taka støðu til atgongdina hjá fólki til náttúruna.

Kommunan skal gera neyðugu raðfestingarnar í kommunukarmarnar fyri at menna ferðavinnuna, sjálvandi við neyvum fyriliti fyri náttúruni. Kommunan skal tryggja karmarnar til eitt fjølbroytt útilív, sum bæði gagnar borgarum og ferðandi í øllum aldri.

Ferðavinnufyritøkur mugu saman við Visit Faroe Islands og lokalu kunningarstovunum tryggja, at ferðavinnuvirksemið ikki er til ampa fyri náttúruna, og at ferðandi kenna sínar skyldur og rættindi har.

Land og kommunur mugu harumframt taka avbjóðingina við útláti av vakstrarhúsgassum í stórum álvara. Sum høvuðsstaður hevur Tórshavnar kommuna eina serliga skyldu til at ganga á odda í umhvørvismálum.

Skulu vit satsa upp á ferðavinnu, mugu grundleggjandi umhvørvisviðurskifti vera upp á pláss. Kommunan eigur at hava ambitiónir um at vera ein kommuna, ið er kend fyri grønar loysnir. Hon eigur at gera tað lætt hjá vinnu og borgarum at velja grønu loysnirnar og má seta grøn krøv.

Ferðafólk seta størri og størri krøv til ferðamálini, tá ið tað kemur til burðardygd. Serliga í vinnuferðavinnu eru krøvini høg, men avkastið samstundis tað hægri. Soleiðis kann ferðavinnan seta ferð á grønu kósina, samstundis sum umsetningurin økist.

### 6.3.1 NÁTTÚRULÍV

Okkum tørvar tíðarhóskandi lógir til náttúruvernd og lógir, sum skipa virksemið og atgongd í náttúruni. Lógarverkið skal tryggja, at náttúran við øllum hennara margfeldi verður vard og endurskapað. Og at javnvág er millum at njóta og nýta hana.

Loysn má finnast á spurninginum um atgongd til náttúruna. Seinastu árini hevur nógv kjak verið um útilív (gongd í haga), men framvegis er atgongdin til náttúruna eitt óloyst mál. Gjaldsportur og gjaldsskipanir eru sett upp á summum støðum í landinum. Óvissan ørkymlar bæði ferðavinnu, bøndur og íbúgvar, og tí er umráðandi at fáa málið loyst, soleiðis at øll kenna síni rættindi og skyldur.

At vera í náttúruni hevur stóran týdning fyri kropsligu og sálarligu heilsuna. Nýggja kanningin, Framtíðar frítíðarvanar og savningarstøð í Føroyum, vísir, at nærum helvtin av vaksnum føroyingum brúka náttúruna til at íðka ítrótt og røra seg í.

*ÁTAK: Landið má gera tíðarhóskandi lógarverk um náttúruvernd og atgongd til náttúruna. Lógarverkið má tryggja fólki atgongd til náttúruna, samstundis sum virksemið í haganum ikki verður darvað. Verndin av okkara náttúrumargfeldi má altíð setast fremst. Ábyrgd: Landið.*

### 6.3.2 FERÐ Á GRØNA SKIFTIÐ

Land og kommuna mugu seta ferð á grønu loysnirnar.

Løgtingið samtykti í 2009 ein veðurlagspolitikk við málinum at minka útlátið av vakstrarhúsgassum í minsta lagi 20% til 2020 í mun til útlátið í 2005, men síðan tá er útlátið bara økt. Tórshavnar kommuna samtykti í 2016 ein umhvørvispolitikk við máli um at minka munandi um útlátið av vakstrarhúsgassi, og at allur hiti og streymur skal koma frá varandi orku í 2030. Eisini hevur kommunan samtykt orkupolitikk við fleiri umhvørvismálum.

Ábøtur eru hendar, t.d. verða fleiri bygningar nú riknir við varandi orkukeldum. Men tað gongur ov seint, og við verandi játtan til orkupolitisk átøk ber ikki til at røkka ásettu orkumál.

Fólkatalið í kommununi veksur. Frá 1. januar 2017 til 1. januar 2022 vaks fólkatalið í Tórshavnar kommunu við 1884 fólkum, og hetta elvir til eyka trýst á umhvørvið, m.a. við burturkasti, CO2-útláti og kloakk. Skal Tórshavnar kommuna røkka grønu málunum, er neyðugt at tryggja, at samsvar er millum mál, játtan og starvsfólkaorku.

Eisini eigur kommunan at bøta um møguleikarnar hjá borgarum og ferðafólki at ferðast meira umhvørvisvinarligt, m.a. við at hava fleiri løðistøðir til akfør kring um í kommununi.

*ÁTAK: Kommunan má tryggja, at málini í umhvørvis- og orkupolitikkinum verða rokkin. Játtan má vera tøk til samtyktu stevnumiðini, og neyðug starvsfólkaorka má vera til at handfara umhvørvismálini.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna*

*Árini 2001–2016 var føroyska útlátið av CO2-eindum uml. 800–900 tons árliga. Í 2020 var tað 1,3 mió. CO2-eindir. 41% av útlátinum stava frá fiskiskipum og 14% frá el- og hitaframleiðslu. Kelda: Umhvørvisstovan.*

### 6.3.3 HÆGRI STIG Í GDS-INDEKSINUM

Vit skulu stremba eftir at fáa hægri stigatal í altjóða GDS-indeksinum (Global Destination Sustainability Index).

Føroyar gjørdust í 2020 partur av GDS, sum er eitt yvirlit yvir burðardygg ferðamál. Ferðamálini verða mett út frá nøkrum avriksøkjum, sum taka støði í heimsmálunum hjá ST, m.a. útlát, burðardygd hjá veitarum umframt stýring og strategi hjá ferðavinnumyndugleikunum

Tilsamans 73 ferðamál vóru við í GDS-indeksinum í 2021. Føroyar fingu 60,5 stig av 100, sum er eitt framstig frá teimum 47,2 stigunum, vit fingu árið fyri. Føroyar gjørdust nr. 41 á listanum.

**Topp 5 á GDS-indeksinum í 2021**

| | |
|---|---|
| Gøteborg | 88.95 stig |
| Keypmannahavn | 85.08 stig |
| Århus | 82.47 stig |
| Glasgow | 80.35 stig |
| Reykjavík | 80.32 stig |

Sum størsta ferðamálið í landinum eigur Tórshavnar kommuna at gera sítt til, at vit fáa hægri stigatal í GDS komandi árini. Hetta gagnar umhvørvinum, borgarum, og vit gerast eitt meira lokkandi ferðamál.

*ÁTAK: Kommunan skal gera greiða ætlan fyri, hvørji mál á GDS-indeksinum skulu røkkast næstu árini. Eitt starvsfólk hjá kommununi eigur at hava GDS sum ábyrgdarøki í samstarvi við fólk hjá Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn. Málið er, at vit í 2023 hava 70 stig í GDS-indeksinum og 80 stig í 2025.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna, Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn.*

### 6.3.4 GRØNARI GISTINGARHÚS OG MATSTOVUR

Alsamt størri krøv eru frá ferðandi um, at gistingarhús og matstovur verða rikin burðardygt. Uttanlands hava gistingarhús og matstovur í stórum tali lagt um til grønar loysnir og hava fingið sertifisering upp á burðardygd, eitt nú Green Key.

*Í dag eru sløk 20% av hotellkømurunum í Havn sertifiserað sum burðardygg av triðja parti, og gongd er á sertifisering av øðrum kømurum.*

Eisini í Føroyum hyggur ferðavinnan grøna vegin, men tað gongur ov seint.

Vit eiga at fáa fleiri kømur sertifiserað, tí hetta er umráðandi fyri umhvørvið, og tí burðardygd er eitt kappingarparametur. Sertifisering gevur okkum eisini hægri stigatal í GDS-indeksinum. Burðardyggari ferðamálið er, áhugaverdari er tað.

Serliga í vinnuferðavinnu seta útlendskar fyritøkur høg krøv til burðardygd og velja ferðamál eftir tí. Skal Havnin standa seg væl í kappingini, mugu fleiri gistingarhús verða sertifiserað. Har tørvur er á tí, eiga Visit Tórshavn og Visit Faroe Islands at ráðgeva á økinum.

Sambært innkeyps- og útboðspolitikkinum[19] hjá Tórshavnar kommunu kunnu fyrilit takast, sum fremja burðardygga menning. Fyri at eggja til grønu umleggingarnar eigur kommunan at umhugsa at raðfesta sertifiseraðu støðini, tá ið hon keypir mat og tænastur frá matstovum og gistingarhúsum. Umhugsast skal eisini, um kommunan skal seta krøv til sertifisering í burðardygd, tá ið loyvi verða givin matstovum og gistingarhúsum.

*ÁTAK: Gistingarhús og matstovur leggja um til grønar loysnir og fáa sertifisering upp á burðardygd eftir altjóða góðkendari skipan. Talið á umhvørvismerktum hotellkømurum eigur at vera 70% í 2023 og 90% í 2025.*
*Ábyrgd: Gistingarhús og matstovur – við ráðgeving frá Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn.*

### 6.3.5 BETRI MØGULEIKAR AT SKILJA

Vinna og borgarar mugu fáa møguleikar til at velja grønar loysnir, eisini viðvíkjandi burturkasti. Serliga yngra ættarliðið leggur stóran dent á endurnýtslu, og fleiri og fleiri ferðandi spyrja um burðardygd og endurnýtslu, tá ið tey velja ferðamál.

Matstovur og gistingarhús í høvuðsstaðnum ynskja sær betri ruskskiljing og møguleika til at skilja matleivdir frá burturkasti.

---

19 https://www.torshavn.fo/media/yoxd2tsf/innkeyps-og-%C3%BAtbo%C3%B0spolitik-kur-fyri-v%C3%B8rur-og-t%C3%A6nastur.pdf

Í grannalondum fara matleivdir til biogassverk, men ikki í Føroyum, tí djóralækna-frøðiligu myndugleikarnir meta tað økja um vandan fyri útbreiðslu av ridluskriða. Matleivdir eru uml. 1/3 av burturkastinum, og tí kundi ein endurvinningarloysn minkað munandi um ruskið til brenniovnin.

Tørvur er á upplýsandi átøkum um endurnýtslu og matoyðsl, m.a. hvussu vit forða fyri, at matur endar sum rusk.

*ÁTAK: Reglulig kunningarátøk skulu gerast um endurnýtslu, burturkast og matoyðsl.*
*ÁTAK: Tórshavnar kommuna skal gera eina langtíðarætlan fyri burturkast, sum m.a. skal tryggja borgarum og vinnulívi fleiri møguleikar at skilja burturkast til endurnýtslu og endurvinning.*
*ÁTAK: Tórshavnar kommuna eigur í samráð við m.a. Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at finna loysnir fyri, hvussu matleivdir skulu handfarast á burðardyggasta hátt.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna og Heilsufrøðiliga Starvsstovan.*

### 6.3.6 GRØN KAMPING

Fólk, sum vitja Føroyar í tjaldi ella kampingvogni, eru vanliga sera tilvitað um umhvørvið og vilja dálka minst møguligt.

Kampingøkið Yviri við Strond er nýumvælt og fær nógv rósandi orð frá ferðandi fyri góðar hentleikar. Tí er óheppið, at orkuskipanin á kampingplássinum koyrir við olju.

Kommunan eigur at bera so í bandi, at kampingøkið verður rikið við grønari orku, t.d. sjóhita ella jarðhita, fyri at avmarka útlát av $CO_2$, og at tað fær góðkenda sertifisering av 3. parti fyri burðardygd. Eisini má okkurt gerast fyri at minka um óljóðið frá tungu ferðsluni, sum koyrir fram við kampingplássinum.

*ÁTAK: Kampingøkið Yviri við Strond leggur um til grøna orku innan 2025 og útvegar sær sertifisering fyri burðardygd.*
*ÁTAK: Ein loysn má finnast á óljóðinum frá tungu ferðsluni fram við kampingplássinum, t.d. ein verja út móti vegnum. Verjan má hóska til náttúruumhvørvið Yviri við Strond.*

### 6.3.7 TJALDING OG SKÝLI

Eitt øki eigur at verða sett av sum tjaldingarøki burturav, sum bæði føroyingar og útlendsk ferðandi kunnu brúka, og sum kann lætta um á kampingøkinum Yviri við Strond í háárstíðini.

Føroyingar hava av álvara fingið eyga á møguleikan fyri at ferðast í náttúruni. Ein serlig uppliving er at tjalda, men nógvar familjur hætta sær ikki út í óbygt øki at tjalda við smábørnum. Ynskiligt er við einum tjaldingarøki í útryðjuni á Havnini, sum hevur einfaldar hentleikar, t.d. vesi og vask.

Økið skal fyrst og fremst brúkast til tjalding, men umhugsast skal eisini at byggja nøkur skýli (shelters) í økinum. Hetta eru skýli, har ein síða er opin, og har tú kanst gista í soviposa. Skýlini eru sera vælumtókt í grannalondunum, serliga millum barnafamiljurnar.[20]

At hava møguleika at gista undir opnum himli gevur fólki betri ans fyri náttúruni, og er samstundis ein umhvørvisvinarligur háttur at ferðast.

*ÁTAK: Kommunan útvegar øki í útryðjuni á Havnini, sum skal brúkst til tjalding og skýli.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna.*

### 6.3.8 KUNNING UM GØTURNAR

Seinastu árini hevur Tórshavnar kommuna gjørt eitt stórt net av gøtum í og rundan um Havnina. Gøturnar fevna um tilsamans 126 kilometrar. Talan er bæði um nýumvældar varða- og bygdagøtur og um nýggjar lendisgøtur.

Gøturnar eru ein frálíkur møguleiki hjá fólki í øllum aldri at ganga, renna ella súkkla langar túrar í náttúruni undir tryggari og meira skipaðum umstøðum. Eisini eru tær ein góður valmøguleiki til at fáa náttúruupplivingar, tá ið nógv virksemi er í haganum so sum fjall, lembing og harutíð.

Fyri at fáa størst gagn av gøtunum mugu tær gerast sjónligari á talgildu miðlunum, í korti og faldarum. Til dømis eigur at bera til at finna uppskot um gongu- og rennirutur eftir gøtunum, og hvar er serliga gott at súkkla. Kunningin eigur at innihalda upplýsingar um serlig søgulig viðurskifti, staðarnøvn o.s.fr.

Eisini eigur at verða kunnað um, hvørjar gøtur serliga hóska til fólk við rørslutarni.

Tá ið gøtur verða gjørdar/umvældar, eigur kommunan at taka fyrilit fyri djóra- og plantulívinum á staðnum.

*ÁTAK: Kunningarátøk skulu gerast fyri at varpa ljós á gøturnar í og kring Havnina.*
*Ábyrgd: Tórshavnar kommuna og Visit Tórshavn.*

---

20 Í Danmark eru yvir 1.000 skýli, har fólk kunnu gista. Talan er bæði um almenn skýli (sum kommunur ella Naturstyrelsen eiga) og privat skýli.

### 6.3.9 KENNA VIRKSEMIÐ Í HAGANUM

Fólk skulu hava betri kunning um virksemið í haganum.

Virksemið í føroysku høgunum er nógv treytað av árstíðini. Í fjalltíð, lembing og haruskjóting skal gangast í náttúruni við varsemi fyri ikki at órógva virksemið og koma sær í vanda.

Visit Faroe Islands eigur – saman við Visit Tórshavn – at tryggja, at neyðuga kunningin um virksemið í haganum kemur út til ferðafólkini, t.d. á kunningarskíggjum á gistingarhúsum. Eisini mugu bøndur kunna haruskjúttar um, hvar varðagøturnar eru, so fólk hava frið at ganga har.

*ÁTAK: Ein ætlan skal gerast fyri kunning um virksemið í haganum.*
*Ábyrgd: Visit Faroe Islands, Visit Tórshavn, bøndur og kunningarstovur.*

## 7. KOSTNAÐARMETING

Ferðavinnupolitikkurin kostar í sjálvum sær onki. Tá ið politisk støða er tikin til einstøku tilmælini, og arbeiðið at íverkseta politikkin av álvara fer í gongd, verða neyvari metingar gjørdar av fíggjarligu avleiðingunum og lagdar til viðkomandi nevndir til støðutakan.

Í nøkrum tilmælum verður lagt upp til eina longri tilgongd, har kommunan yvir nøkur ár setur av neyðuga játtan og starvsfólkaorku til tess at fremja tey í verki. Onnur tilmæli eru skjótari at seta í verk.

Talan er í ávísan mun um átøk, sum fevna um virkisøki hjá fleiri deildum í kommununi. Í øðrum førum er talan um at hækka játtanina til ein ávísan stovn.

Fleiri av tilmælunum fevna um átøk, sum aðrir myndugleikar – og ofta fleiri – skulu fremja. Tað er til eina og hvørja tíð upp til myndugleikarnar at taka støðu til, um tilmælini skulu fremjast, og hvussu karmarnir skulu skipast bæði bygnaðarliga, starvsfólkaliga og fíggjarliga.

Niðanfyri verða kostnaðarmeting og tíðarætlan umframt ábyrgdin av átøkunum lýst.

Havast skal í huga, at kostnaðarmetingarnar skulu takast við fyrivarni, tí arbeiðsbólkurin hevur ikki havt umstøður til at fara heilt neyvt inn í hvørt einstakt øki at gera kostnaðarmetingar. Áðrenn tilmælini verða sett í verk, mugu neyvari kostnaðarmetingar gerast.

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **JAVNVÁG MILLUM BÚGVANDI OG VITJANDI** | | | | | | | |
| Samstarvið um vinnuferðavinnu eigur at verða styrkt við øktari játtan, soleiðis at vit kunnu fáa fleiri ráðstevnur og tiltøk hendanvegin.<br><br>Land og kommuna eiga at hava eina meira samlaða og gjøgnumskygda stuðulsskipan til vinnuferðavinnu. | TK/Landið | Eitt starv | | | 500.000 kr. | | |
| Visit Tórshavn eigur at fáa hægri játtan til at fremja ferðavinnupolitikkin í verki og at marknaðarføra Tórshavn sum ferðavinnu- og vinnuferðavinnubý. | TK | | | 500.000 kr. | 500.000 kr. | | |
| Stovnast skulu fleiri útbúgvingar í ferðavinnu í Føroyum og ein ætlan gerast fyri, nær hesar kunnu bjóðast út. | Landið | Nærri útgreining, tá ið landið hevur tikið støðu. | | | | | |
| Landið má raðfesta TSA-verkætlanina við at veita neyðugu játtanina. Er tørvur á fígging frá Tórshavnar kommunu til RTSA, eigur hon at vísa hesum vælvild. | Landið | TSA-verkætlanin er í gongd.<br><br>Tá ið skipanin verður víðkað til eisini at fevna um RTSA, verður nærri fíggjarlig útgreining gjørd og støða tikin til, um hetta skal fíggjast innan verandi játtanarkarm. | | | | | |
| Tórshavnar kommuna styrkir samskiftið við ferðavinnuna og ger smidligari mannagongdir fyri málsviðgerð | TK | Verandi játtan og starvsfólka-orka. | | | | | |
| Visit Tórshavn eigur í samstarvi við Hugskotið at stovna eitt netverk fyri smærri ferðavinnu-aktørar og skipa fyri kveikjandi og førleikamennandi tiltøkum fyri teir. | TK/VT/ Hugskotið | Starvsfólkaorka og verandi játtan hjá ávikavist Hugskotinum og Visit Tórshavn. | | | | | |
| Bygdirnar og tey mest vitjaðu støðini í Havn mugu hava almenn vesi. Skjól skulu útvegast til ferðafólk á oyggjunum, og Visit Tórshavn heldur á at skelta, har tørvur er á tí. | TK/VT | Vesiætlan er gjørd í 2018. Kostnaðarmeting sambært vesiætlan hjá Tórshavnar kommunu er 700.000 kr. pr. vesi.<br><br>Vesi eru klár at seta upp í Nólsoy og Hesti, og verður hetta gjørt í ár.<br><br>Skeltingarætlan er gjørd. Kostnaðarmeting 120.000 kr. um árið fyri skelti og uppseting. | 120.000 kr. | 700.000 kr.<br><br>120.000 kr. | 700.000 kr.<br><br>120.000 kr. | 700.000 kr.<br><br>120.000 kr. | 700.000 kr.<br><br>120.000 kr. |
| Allar bygdir í kommununi skulu kunna hava góðar møguleikar at menna ferðavinnu. Ætlanir og átøk skulu taka støði í einstøku bygdunum og gerast í tøttum samstarvi við íbúgvar á staðnum. | TK/VT | Ferðavinnuætlanir eru gjørdar fyri Nólsoy og Kirkjubø. Kostnaðurin av at gera ætlanirnar varð fíggjaður av játtanini til ferðavinnu á fíggjarætlanini hjá Tórshavnar kommunu. So hvørt tilmælini eru framd, er støða tikin til, hvussu tey verða fíggjað. | | | | | |

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna eigur áhaldandi at arbeiða fyri einum livandi miðbýi og eisini virka fyri trivnaði í økjum við sjóvarmálan.<br><br>Kommunan eigur at seta í verk tiltøk, sum stuðla uppundir, at fólk í øllum aldri búseta seg í miðbýnum. | TK | Býarskipanardeildin mælir til, at settar verða áleið 10 mió. kr. av um árið næstu 4 árini til at fremja átøk, sum skapa ein livandi miðbý og trivnað í økjum við sjóvarmálan.<br><br>Kostnaðarmeting verður gjørd, so hvørt kommunan tekur støðu til átøk, sum skapa ein livandi miðbý og trivnað í økjum við sjóvarmálan. | | 10 mió. kr. | 10 mió. kr. | 10 mió. kr. | 10 mió. kr. |
| Arbeiðið við cruisestrategiini hjá Tórshavnar kommunu skal takast upp aftur, soleiðis at kommunan hevur eina ætlan fyri hesa vinnu. Í hesum sambandi skulu serlig fyrilit takast fyri nógv vitjaðum støðum so sum Reyn og Kirkjubø. | TK/TH/VT | Starvsfólkaorka hjá stjórnarskrivstovuni, Visit Tórshavn og Tórshavnar Havn. | | | | | |

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| KVEIKJANDI MENTAN | | | | | | | |
| Tórshavnar kommuna orðar ein mentanarpolitikk, har sett verður út í kortið visjónir og mál fyri mentanarøkið næstu 10–12 árini. | TK/MD | Starvsfólkaorka má setast av til at orða politikkin. | | 300.000 kr. | | | |
| Tórshavnar kommuna eigur at stuðla ætlanini hjá Vakstrarforum um, at Havnin gerst evropeiskur mentanarhøvuðsstaður í 2030. | Landið | | | | | | |
| Kommunan eigur at raðfesta søvnini í høvuðsstaðnum, soleiðis at tey kunnu geva borgarum og ferðafólki góðar og kveikjandi upplivingar. | TK | Kostnaðarmeting gerast, so hvørt støða verður tikin til einstøk søvn. | | | | | |
| Landið má tryggja, at fornminnini í Kirkjubø og á Skansanum verða varðveitt. Kommunan og landið mugu saman við Tjóðsavninum tryggja, at undirlendið við fornminnini í Kirkjubø verður vart, og tryggja eitt livandi umhvørvi á Skansanum. Loysnirnar mugu hava fyrilit fyri virkseminum á staðnum og virðing fyri fornminnunum. | Landið/TK | Kostnaðarmeting gerast, tá ið landið og kommunan hava funnið ein leist at fremja tilmælini eftir, og hvussu uppgávubýtið verður. | | | | | |

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kommunan stuðlar Koltursætlanini við eitt nú at dagføra vatn-, kloakk- og lendingarviðurskiftini í oynni. | Landið/TK | Mett verður, at kostnaðurin fyri at dagføra kloakk og vatn er áleið 2 mió. kr. Fíggjast av rakstrarjáttan á tekniska økinum.<br>Neyðugt at gera ítøkiligar metingar, so hvørt støða verður tikin. | | 1 mió. kr. | 1 mió. kr. | | |
| Landið má gera tíðarhóskandi lógarverk um náttúruvernd og atgongd til náttúruna. Lógarverkið má tryggja fólki atgongd til náttúruna, samstundis sum virksemið í haganum ikki verður darvað. Verndin av okkara náttúrumargfeldi má altíð setast fremst. | Landið | | | | | | |

| Átak | Ábyrgd | Kostnaður | 2022 | 2023 | 2024 | 2025 | 2026 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| GRØNT FERÐAMÁL | | | | | | | |
| Kommunan má tryggja, at málini í umhvørvis- og orkupolitikkinum verða rokkin. Játtan má vera tøk til samtyktu stevnumiðini, og neyðug starvsfólkaorka má vera til at handfara umhvørvismálini. | TK | Sambært orkupolitikkinum er tørvur á íløgum fyri 90 mió. kr. fram til 2027 til endamálið. Umhvørvisdeildin hevur víst á, at neyðugt er at raðfesta starvsfólkaorku til at handfara umhvørvismálini. | | | 500.000 kr. | | |
| Kommunan skal gera greiða ætlan fyri, hvørji mál á GDS-indeksinum skulu røkkast næstu árini. Eitt starvsfólk hjá kommununi eigur at hava GDS sum ábyrgdarøki í samstarvi við fólk hjá Visit Faroe Islands og Visit Tórshavn. Málið er, at vit í 2023 hava 70 stig í GDS-indeksinum og 80 stig í 2025. | TK/VT | Verandi starvsfólkaorka. | | 500.000 kr. | 500.000 kr. | | |
| Gistingarhús og matstovur leggja um til grønar loysnir og fáa sertifisering upp á burðardygd eftir altjóða góðkendari skipan. Talið á umhvørvismerktum hotellkømurum eigur at vera 70% í 2023 og 90% í 2025. | Vinnan | | | | | | |
| Reglulig kunningarátøk skulu gerast um endurnýtslu, burturkast og matoyðsl.<br><br>Tórshavnar kommuna skal gera eina langtíðarætlan fyri burturkast, sum m.a. skal tryggja borgarum og vinnulívi fleiri møguleikar at skilja burturkast til endurnýtslu og endurvinning.<br><br>Tórshavnar kommuna eigur í samráð við m.a. Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at finna loysnir fyri, hvussu matleivdir skulu handfarast á burðardyggasta hátt. | TK/Landið | 200.000 kr. árliga til kunningarátøk.<br><br>Uml. 2 mió. kr. til at gera eina langtíðarætlan, tí fólk skulu gera kanningar, kortleggingar o.a.<br><br>Áleið 8 mió. kr. árliga í eini 4 ár til loysnir at handfara matleivdir. | | 200.000 kr.<br><br>1 mió. kr.<br><br>8 mió. kr. | 200.000 kr.<br><br>1 mió. kr.<br><br>8 mió. kr. | 200.000 kr.<br><br>8 mió. kr. | 200.000 kr.<br><br>8 mió. kr. |
| Strond leggur um til grøna orku innan 2025 og útvegar sær sertifisering fyri burðardygd.<br><br>Ein loysn má finnast á óljóðinum frá tungu ferðsluni fram við kampingplássinum, t.d. ein verja út móti vegnum. | TK | Leysliga mett 300.000 kr.<br><br>Kostnaðurin at loysa trupulleikan við óljóði veldst um, hvør loysn verður vald. | | 300.000 kr. | | | |
| Kommunan útvegar øki í útryðjuni á Havnini, sum skal brúkst til tjalding og skýli. | TK | Lendi til endamálið. | | | | | |
| Kunningarátøk skulu gerast fyri at varpa ljós á gøturnar í og kring Havnina | TK/VT | Kostnaðarmeting gerast, tá ítøkiligt uppskot fyriliggur. | | | | | |
| Ein ætlan skal gerast fyri kunning um virksemið í haganum. | VFI/TK/VT | Verandi játtan. | | | | | |